# HAPPING Í FÓLKASKÚLANUM

## - ein spurnakanning

Granskingardepilin - Fróðskaparsetur Føroya 2015

**ISBN 978-9991-8-60-24-4**

# Happing í fólkaskúlanum - ein spurnakanning

Olga Biskopstø, cand.comm.
Granskingardepilin - Fróðskaparsetur Føroya

Katrin av Kák, cand.mag og cand.ped.psyk.
Námsvísindadeildin - Fróðskaparsetur Føroya

Martha Mýri, MA - Politics and International Relations
Granskingardepilin – Fróðskaparsetur Føroya

**RIT NR. 31 /2015**

***Hetta rit*** *er eitt samfelagsfakliga grundað arbeiði, ið byggir á eina kvantitativa spurnakanning. Slík rit kunnu eitt nú vera umbidnar kanningar, tvs. kanningararbeiði, sum Granskingardepilin ger móti gjaldi. Hetta kunnu eisini vera ávegis arbeiði av størri granskingarverkætlanum, undirvísingar- og kunningartilfari ella líknandi. Ritini vera altíð skrivað á føroyskum. Hava fólk handrit, sum tey halda eru egnað til slíka útgávu, eru tey vælkomin at seta seg í samband við Granskingardepilin.*
*Rit nr. 31/2015, Happing í fólkaskúlanum, ein spurnakanning. Olga Biskopstø, Katrin av Kák og Martha Mýri 2015. Útgevari: Granskingardepilin - Fróðskaparsetur Føroya og Mentamálaráðið. Prent: Føroyaprent.*

**ISBN 978-9991-8-60-24-4**

# Formæli

Landsstýrismaðurin í mentamálum, Bjørn Kalsø, setti í 2014 skjøtul á arbeiðið at kanna happing millum føroyskar fólkaskúlanæmingar, so til bar at fáa til vega dagførda vitan um happing. Endamálið er, at hetta skal gerast grundarlag undir dagførdum tiltøkum í fólkaskúlunum. Í 2007 var samsvarandi kanning gjørd og eitt tilmæli í kjalarvørrinum. Henda kanning skal eisini eftirmeta hesi átøk.

Tað er Granskingardepilin - Fróðskaparsetur Føroya, ið hevur gjørt kanningina fyri Mentamálaráðið. Olga Biskopstø, Katrin av Kák og Martha Mýri hava staðið fyri arbeiðinum. Arbeiðið hevur verið skipað við einum fylgibólki, ið tryggjar, at tað lidna arbeiðið verður rætt og viðkomandi. Harumframt hevur fylgibólkurin saman við Fróðskaparsetri Føroya víst á tiltøk, ið kunnu fyribyrgja happing í skúlunum.

Í fylgibólkinum hava hesi verið: Frida Poulsen, fulltrúi, og Jenny Lydersen, undirvísingarleiðari, frá Mentamálaráðnum, Herálvur Jacobsen, formaður í Føroya Lærarafelag, Hanus Joensen, skúlastjóri, og Tom Joensen, skúlaleiðari, Durita Jakobsen, AKT-lærari, og Annika Sølvará, forkvinna í Heim og skúli.

Kanningin byggir á eina spurnakanning gjørd millum næmingar og lærarar í 2014/15. Fakliga grundarlagið byggir á ástøði og kjak um hetta evnið í Føroyum og okkara grannalondum seinnu árini.

Vit vilja nýta høvið at takka næmingum, skúlaleiðarum, lærarum og foreldrum, ið hava gjørt hesa kanning møguliga. Eisini ein tøkk til fylgibólkin fyri konstruktivt kjak og stuðul, og tøkk til øll tykkum, ið hava veitt okkum góð ráð, konstruktivar viðmerkingar og rættlestur. Eisini ein tøkk til Dorte Marie Søndergaard og Inge Henningsen á Aarhus Universitet fyri fakligan íblástur, til lesandi, ið hava hjálpt at gera kanningina úti í skúlunum, og tykkum onnur, ið á annan hátt hava stuðlað okkum í arbeiðinum.

Tann 8. mai 2015

*Olga Biskopstø* *Katrin av Kák* *Martha Mýri*

# Innihaldsyvirlit

**Inngangur** 9

**1. Partur, Happing sum fyribrigdi** 11
Spurningur um paradigmi 11
Hvussu kunnu vit skilja happing? 12
Ótti fyri útihýsing 12
Framleiðsla av andstygd 13
Parallelmoralur og látur 13
Ábyrgdarkensla 13
Empati 14
“Longing for belonging” 14
Happing sum bólkafyribrigdi 14
Okkara útgangsstøðið 15

**2. Partur, Happing í tølum og talvum** 17
Eg happi eisini 17
Happing samanlagt 18
Kyn 18
Hvør happar hvønn? 19
Lærarin happar 19
Happing og flokkar 19
Tey í 9. flokki happa mest 19
Happing og stødd á skúla 20

**2.2 Happing og trivnaður** 20
Trivnaður - kyn, flokkar og stødd á skúla 21
Trivnaður og at duga væl ella illa 21
Trivnaðurin og vinir í skúlanum 22
Floksmentan og happing 22
At bera ótta fyri happing 23
At kenna onkran, sum verður happaður 24
At óttast fyri at vera hildin uttanfyri 24

**3.3 Hvussu fer happingin fram** 25
Kropslig og sálarlig happing 26
Happing í sosialu miðlunum 26
At happa vegna útsjónd, húðarlit o.a. 26
Hvussu verður happað í mun til kyn 27

**3.4 Hvar verður happað** 27

**3.5 Fráboðan um happing** 28
Atferð í mun til happing 29
At fáa hjálp 29
Hvat ger skúlin við happing? 29
Samanbering við kanningina í 2007 29
Støðan í dag samanborin við 2007 30

**3. Partur, Kjak og faklig viðgerð** ..... 31
Óttin fyri útihýsing ..... 31
Happing er ikki altíð sjónlig og ítøkilig ..... 31
Dreingir og gentur ..... 32
At trívast saman ..... 32
At vera í skúla, og longsul at hoyra til ..... 32
Læringin í vanda ..... 33
At angra luttøku í happing ..... 33
Avleiðingar av happing ..... 33
Skemt, at flenna og ”Bara til stuttleika” ..... 33
Hvar fer happing fram? ..... 34
Happimynstur ..... 34
Happing í sosialu miðlunum ..... 34
At siga frá ..... 35
Happing sum orð og fyribrigdi ..... 35

**4. Partur, Átøk í skúlunum og hugburður lærarans** ..... 37
Tilmælið ..... 37
Tiløkini í skúlunum ..... 37
Lærarakanningin ..... 37
Hvør eigur ábyrgdina ..... 38
Bygnaður og førleikar ..... 40

**5. Partur, Samandráttur og niðurstøða** ..... 41
Dømi um ítøkilig átøk: ..... 42

**6. Partur, Bókmentalisti** ..... 43
Bókmentir ..... 43
Tíðarrit ..... 43
Heimasíður ..... 43

**7. Partur, Ískoyti** ..... 45
**Framferðarháttur** ..... 45
Samanbering við kanningina í 2007 ..... 45
Tilrættalegging ..... 45
Úti í skúlunum ..... 46
Innihaldið í spurnablaðnum ..... 46
Viðgerð av spurnabløðunum ..... 47
Kanningin millum lærararnar ..... 47
Hugtakið happing í spurnablaðnum ..... 47
Lýsingin av happing í spurnakanningini 2007 ..... 47

**Spurnablað til næmingar** ..... 49

**Spurnablað til lærarar** ..... 61

# Inngangur

*”Man kundi gjørt meira fyri at steðga happing og ikki bara tosa um tað. Og tað nyttar onki at finna útav, hvussu nógv verða happað, tað kann man ikki brúka til nakað”.*

Happing er eitt fyribrigdi, ið er nógv umtalað, trupult at fáast við og finst alla staðni í samfelagnum. Talan er um atferð í sosiala samspælinum millum menniskju, ið særir, skapar ótryggleika og gevur pínu og sálarlig arr. Men hví byrjar happing? Er talan um hendingar, einstaklingar ímillum ella um sosialt samspæl, eina happimentan ella okkurt heilt annað? Hvussu skulu vit í grundini allýsa happing? Og ikki minst, hvat kunnu vit gera fyri at minka um ella steðga hesum niðurbrótandi fyribrigdi?

Seinnu árini hevur ástøðiliga kjakið um happing tikið dyk á seg, og serliga happing sum eitt sosialt fyribrigdi. Hetta kjak er serliga myndað av eitt nú tí evropeiska tvørfakliga granskingarbólkinum eXbus[1]. Henda gransking tykist avloysa nógv brúktu ástøðina hjá sálarfrøðinginum Dan Olweus, ið var meira einstaklingsmerkt.

Hóast øll kenna orðið happing, kenna onkran sum er happaður ella sjálv hava upplivað tað, so er vitanin um happing framvegis sparin. Tá tað snýr seg um happing í skúlanum, er tað eyðsæð, at happing ávirkar tað einstaka barnið, ið mistrívist, men tað ávirkar eisini samspælið og tey fakligu avrikini í flokkinum, meira enn vit geva okkum far um.

Henda kanning um happing í føroyska fólkaskúlanum er skipað í samráð við Mentamálaráðið. Hon tekur støði í ynski hjá Mentamálaráðnum at tryggja best møguligan trivnað og umstøður fyri næmingar og lærarar. Orðaði málsetningurin fyri kanningina er: *at kanna happing í øllum føroyska fólkaskúlanum, at fáa til vega dagførda vitan, ið kann gerast grundarlag undir dagførdum tiltøkum, til tess at minka um happing, og harvið økja um trivnað og læring.*

Tað er ein sannroynd, at einasti vegur at fáa happing úr fólkaskúlanum, er at styrkja kunnleikan um happing og skipa málrættað átøk hesum at frama. Hesi átøk eiga at byggja á gott vísindaligt støði og dagførdar kanningar.
Í 2007 var fyrsta kanningin av happing í føroyska fólkaskúlanum gjørd. Tað var Granskingardepilin, ið gjørdi kanningina eftir áheitan frá Mentamálaráðnum. Umleið 2.200 næmingar í øllum 5., 7. og 9. flokkunum kring landið luttóku. Úrslitið av kanningini vísti, at 15% av næmingunum vóru fyri happing. Hetta tal var nakað hægri enn í okkara grannalondum, har talið lá millum 12 og 13%. Mentamálaráðið setti ein bólk at gera tilmæli til átøk fyri at minka um hesa happing. Úrslitið var ein frágreiðing, ið legði upp til eina røð av tiltøkum úti í skúlunum.

Nú eru 7 ár liðin, síðan henda kanning var gjørd, og nærum 7 ár síðani átøk vóru sett í verk, tí er tað sera áhugavert at vita, í hvønn mun hetta arbeiðið hevur borið frukt.

Spurnakanningin, sum fyriliggur nú, er, eins og hon í 2007, gjørd millum allar næmingar í 5., 7. og 9. flokkunum í landinum, tilsamans 2.125 næmingar. Av teimum spurdu, svaraðu 1.995 settu spurningunum, t.v.s. 94%. Henda stóra luttøka ger, at talan er um eina hagfrøðiliga álítandi kanning. Kanningarhátturin, ið innibar, at løtan, ið spurnakanningin fór fram, var merkt av friði millum næmingar og spyrjarar, hevur eisini gjørt, at svarini kunnu metast at vera álítandi.

Kanningin nú vísir, at talið á teimum, ið upplliva at verða happað, í dag er 13% ímóti 15% í 2007. Hetta er ein bati á 2%. Orsøkin til batan kann hugsast at vera tey átøk, ið vóru sett í verk eftir kanningina í 2007. Men samstundis sum hesi tøl vísa ein bata, so eru tað onnur tøl, ið vísa, at trupulleikin í mangar mátar er størri og meira samansettur enn so.

Við støði í umfatandi tilfarinum í kanningini fara vit at lýsa happing úr fleiri sjónarhornum. Fyrst og fremst úr sjónarhorninum hjá næmingunum, har vit hava møguleika at lýsa happing, bæði í vavi og í skapi. Vit hyggja eisini at happing í mun til kyn, flokkar, stødd á skúlum, umframt aðrar samanberingar.

Fyri at kunna eftirmeta átøkini í skúlunum valdu vit, umframt at spyra næmingarnar, eisini at spyrja lærararnar um hetta. 154 lærarar, sum undirvísa í 5., 7. og 9. flokkunum, vóru spurdir, harav 66 svaraðu. Hetta er eitt svarprosent á 43, ið ikki er gott, men brúkiligt. Til seinast í kanningini samanbera vit úrslit við fakliga kjakið í okkara grannalondum og gera eina roynd at seta nøkur av evnunum í ein breiðan fakligan samanhang.

*1: eXbus-verkætlanin tekst við happing í skúlanum. Granska verður í hvussu happig uppstendur, verður hildin viðlíka, broytist og møguliga kann steðgast. www.exbus.dk.*

Sum nevnt, so er tilfarið í hesi kanning sera umfatandi og gevur nógvar møguleikar fyri greiningum, eins og møguleikanum at gera tilmæli til átøk.

**Frágreiðingin er skipað í 7 pørtum:**

1. partur viðger fyribrigdið happing.
2. partur lýsir happing í tølum og talvum og ger samanbering við kanningina í 2007.
3. partur greinar viðurskifti í 2. parti gjøllari og setur tey inn í ein fakligan samanhang.
4. partur lýsir átøkini í skúlunum og viðger spurnakanningina millum lærararnar.
5. partur er ein samandráttur við ávísing til møgulig tiltøk.
6. patur, keldulisti
7. partur, framferðarháttur og spurnabløð.

Luttakandi næmingarnir í kanningini hava skrivað fleiri hundrað stuttar frásagnir um egnar upplivingar við happing. Endurgevingar úr hesum verða brúktar gjøgnum alt ritið, fyri at undirbyggja og lýsa tað, vit skriva. Hesar endurgevingar standa í klombrum og við skákskrift.

**Teknfrágreiðing:**
**(N=)**: sigur talið á teimum, sum hava svarað hvørjum einstakum spurningi.

# 1. Partur

## Happing sum fyribrigdi

Kanningin um happing í fólkaskúlanum, sum var gjørd í 2007, varð skipað eftir leistinum hjá svenska sálarfrøðinginum Dan Olweus (Olweus 2000). Spurnablaðið var umsett og lagað til føroysk viðurskifti. Hesin leistur hevur verið brúktur í meginpartinum av evropeiskum kanningunum nógv tey seinnu árini.

Leisturin hjá Olweus byggir á tað, vit í mynd 1. lýsa sum paradigme 1. Tilgongdin hjá Olweus til happing byggir á eina fatan av einstaklingum sum ábyrgdarhavarar í happing.

Hesir einstaklingar kunnu fáa eitt spjaldur sum havandi ikki-ynskiligar eginleikar. Um veruleikin er so, merkir tað, at ein stórur partur av okkara børnum eru veik, óttafull ella mangla empati.

Hetta er ein vansi og annar vansi er hesin, at samanhangurin (konteksturin) og bólkurin verða ikki tiknir við, og tískil avmarkar tað nyttuna í valda átakinum at basa happingini. Harafturat er tað so, at happing sæð í hesum ljósinum krevur áhaldandi fokus á tann einstaka og skal loysast sum eitt einstaklingsmál. Hetta treytar grund–hugsjónin hjá Dan Olweus, hóast hann eisini dregur tann sosiala samanhangin inn í ein ávísan mun.

Við hesum kunnleika til kanningarháttin hjá Olweus og við kunnleika um, at tað eru aðrar áskoðanir á fyribrigdið happing, fóru vit undir at kanna hesar nærri, eitt nú tilgongdina hjá gransk–ingarbólkinum eXbus. Við støði í okkara egnu fatan og vitan um evnið, saman við tí vitan, ið kanningararbeiðið hevur givið okkum, tóku vit avgerð um at vraka tilgongdina hjá Olweus og ganga nýggjari leiðir.

Við hesi avgerð stakk ivamál seg upp, um vit mistu møguleikan at samanbera kanningarúrslitið við kanningina í 2007. Hetta ivamál loystu vit við at varðveita beinagrindina í gamla spurnablaðnum, so tað í ávísan mun ber til at gera samanberingar.

**Spurningur um paradigmi**

Eitt paradigmi merkir fyrimynd ella mynstur. Ein paradigma kann síggjast sum eitt mynstur, sum er bygt upp av hugsan og fatan av vísindum og veruleika.

Við tí fyri eyga at síggja happing sum eitt fyribrigdi, ið ikki er so persónsleikatengt, sum tað hjá Olweus, men sum eitt fyribrigdi, ið knýtir seg til sosial sambond og felagsskap, settu vit eina paradigmi upp. Mynd 1.

## Tvær paradigmur

| 1 | 2 |
|---|---|
| **1972 →** | **2003 →** |
| **Olweus** | **Rabøll Hansen, eXbus** |
| • Persónsmenskusálarfrøði | • Sosialsálarfrøði, antropologi |
| • Einstaklingur | • Samspæl |
| • Subjekt-objekt | • Subjekt-subjekt |
| • Íbygdir, viðføddir eginleikar | • Angist í bólkinum |
| • Persónsmenska | • Relatiónir |
| • Familjan | • Samanhangur |
| • Orsøk – virking: Hví? | • Mynstur: Hvør, hvat, hvussu, nær? |
| • Happari, offur, eygleiðari | • Positiónir |
| • Skyld, feilur | • Tign, andstygd |

**Mynd 1.**

Vit hava valt, at okkara tilgongd til hesa kanning um happing skal byggja á paradigmi 2, og tað verður brúkt sum okkara útgangsstøði.

**Í paradigmu 2 er happing lýst soleiðis:**
Happing er eitt sosialt fyribrigdi, sum stingur seg upp í bólkum undir givnum umstøðum.

Happing kann vera kropslig, sálarlig, sosial, beinleiðis, óbeinleiðis, søgd við orðum og orðaleys.

Hetta er eitt sjónarmið, ið tekur støðu í vísindaliga uppáhaldinum um, at veruleikin er ein sosial konstruktión. Hetta stuðlar undir eitt nú menningarsálarfrøðina, sum vísir á, at sjálvið mennist gjøgnum upplivilsir saman við øðrum. T.v.s. at tað eru ikki viðføddir, íbygdir eginleikar, sum mynda okkum sum menniskju, og sum eru avgerandi fyri atferð, læring og máta at vera og gera. Eginleikar hjá tí einstaka verða mentir í samspælinum við onnur. Tískil er tað í samspælinum, at vit kunnu gera broytingar og ikki í tí einstaka.

Í verkætlanini eXbus mæla granskarar til at endurhugsa happing og geva nøkur boð uppá, hvat happing er, og hvussu hon kann skiljast. Granskingin hevur havt sum mál at skilja mekanismurnar í happing út frá staðfestingini av, at tilgongdir og tiltøk í sambandi við happing í skúlum sjáldan hava eydnast við gomlu fatanini av happing. Annað mál hevur verið at menna eina nýggja hugsitøkni viðvíkjandi happing. Also seta orð og heiti á ymisku lutirnar og smálutirnar í fjøltáttað sosiala fyribrigdinum happing.
Í paradigmu 2 eru tvey grundleggjandi fyribrigdi í hugsitøknini, sum geva happing megi. Í felag eru hesi fyribrigdini sjálv drívmegin í happing. Tey verða kallað ótti fyri útihýsing (eksklusiónsangist) og longsul eftir at hoyra til (longing for belonging).

*”Fyrst var eg hildin uttanfyri eitt sindur, men so tá ein annar næmingur byrjaði at blíva happaður fylgdi eg bara við, tí eg var bangin fyri at tað sama skuldi henda við mær aftur.*

**Ótti fyri útihýsing**
Menniskjan er ein sosial vera, er einki uttan onnur og hevur eina grundtráan eftir at hoyra til. Henda tráanin er so avgerandi fyri eksistensin, at óttin, fyri ikki at vera innlimaður og góðtikin í bólkinum, alla tíðina latent er til staðar. Myndaliga er óttin ein glóð, sum liggur í einhvørjum bólki ella felagskapi. Glóðin kann verða tendrað og eldur kann koma í, tá ótryggleiki í bólkinum fær yvirhond og angist er.

Tað eru nógv samspælandi viðurskifti, sum tryggja tryggleika í einum bólki. Ein skúlaflokkur er altíð partur av einum samanhangi. Hvør næmingur sær, lærarar, foreldur og onnur, tíð og stað eru viðskaparar av felagsskapinum og hava sína




**Hvussu kunnu vit skilja happing?**

**Mynd 2.**

ávirkan á skúlaflokkin. Hetta eru kreftir, innanhýsis- og uttanhýsis frá, sum eru í spæli í skúlaflokkinum og eru við til at skapa sosiala dynamikkin. Tá hann er góður, trívast øll.

Tá sosiali dynamikkurin fer av kós, er skúlaflokkurin undir trýsti. Glóðin, óttin fyri útihýsing, sum alla tíðina hevur ligið har, fær nøring. Stríðið um at hoyra til, og stríðið at sleppa undan ótespiligu kensluni av angist, setur skaðandi mekanismur í gongd. Hierarki, metingar, kolldømingar og ymisk virði, koma á skránna, hvørt um annað – alt meira og minni ótilvitað. Angistin reikar í flokkinum og leitar eftir einum máli at raka. Hetta málið kann vera onkur ella okkurt, *ein positión.*

*"Vit happaðu hann, men eg veit ikki ordiliga hví."*

**Framleiðsla av andstygd**

Angistin skapar spenningar og óttin fyri útihýsing rópar eftir linna. Linnin gerst framleiðsla av andstygd í bólkinum. Leitað verður eftir eyðkennum, fyribrigdum, eginleikum og hendingum, sum verða andstyggiliggjørd. Tað kann vera útsjónd, dugnaskapur, klæði og annað, sum verða tillátursgjørd. Tað er einstaki nemingurin, sum verður raktur, men tað er positiónini, andstygdin er vend móti. Øll viðurskifti hjá viðkomandi í álopnu positiónini kunnu verða brúkt. Soleiðis kann tað ein dag vera andstyggiliggjørt t.d. at ganga í ávísum klæðum og hava ávísa útsjónd, meðan tað dagin eftir t.d. kann vera at hava mammu, sum er deyð. Angistin reikar runt í flokkinum, og harvið skifta positiónirnar millum tey, sum happa og tey, sum verða happað. Tað ræður um at tryggja sær pláss, status og tryggleika í felagsskapinum.

*"Eg fór ikki við á setursskúla, tí ein drongur í flokkinum segði, at tað var gott, at systir mín doyði, tí hvis hon hevði livað, so hevði hon ikki tímað at verið systir mín, tí at eg eri so býtt."*

Hvør ella hvat skal háðast, kallast, fíggindagerast kann soleiðis raka tilvildarligt. Tað kann vera ein næmingur ella onkur viðurskifti, sum harvið eru sett uttan fyri felagsskapin. Næmingurin er í einari positión, sum verður útihýst (ekskluderað), og tað er gjøgnum útihýsingina, at felagsskapskenslan hjá hinum í bólkinum gerst sterkari. Uttan atgongd til felagsskapin og viðurkenning hagani, er tignin hjá næminginum tikin frá honum. Tá inklusión og viðurkenning eru virkin og eydnast, er talan um framleiðslu av tign. Hetta er, tá dygdir, styrki, viðurkenning, ymiskleiki og ósemjur fáa rúmd og kunnu verða tikin upp til samrøðu í flokkinum.

Framleiðslan av andstygd kann bæði verða søgd við orðum og fara fram orðleyst gjøgnum gerðir og rørslur í bólkinum, har næmingarnir samstemmað viðvirka til at herða andstygdina.

Tá henda gongdin og hesar gerðir eydnast, er tað happing. Og tá sosiala angistin fer í panikk, tykist øking í framleiðsluni av angist at vera einasta vegur at finna linna.

*"Tað er ræðuligt. Eg vil ikki fara í skúla tá, tí eg eri bangin fyri, hvat tey nú fara at siga."*

Í sær sjálvum er hetta ræðuligt fyri tann rakta næmingin. At vera í hesari støðuni kennist sum tann rami óndskapur. Henda bólkaframleiðsla av andstygd eru óreflekteraðar gerðir, har tað ikki verður tikið synd í viðkomandi, sum verður raktur. Ongin vil hava angistina, og øll vilja hoyra til. Hetta er stríðið, sum fer fram millum næmingarnar, og sum skapar sjálva happingina. Sosialur ótti fyri útihýsing ræður í hesari støðuni.

*"Ein genta bleiv kallað býtt og feit. Eg gjørdi onki, tí eg vildi ikki hava, at tað kom aftur á meg.*

**Parallelmoralur og látur**

Undir happing fáast næmingar við ein sokallaðan parallelmoral. Empati og samvitska verða sett til viks eina løtu, og forteljingar og forkláringar verða skaptar, sum legitimera særandi gerðir og hendingar. Soleiðis verður happingin normaliserað. Parallelmoralurin er sostatt eitt lið í happimynstrinum í felagsskapinum.

Ein ítøkiligur og vanligur liður í happimynstrinum er látur, sum er viðvirkandi til at fráskriva ábyrgd fyri og loyvir gjørdu gerðina ella útsøgnina. Látur verður soleiðis eisini eitt amboð hjá teimum raktu í vónini um at sleppa upp í part.

*"Tað er ikki serliga ofta, at vit happa. Tað er fyri tað mesta fyri stuttleikar og persónurin, sum verður happaður, flennir sum oftast sjálvur."*

**Ábyrgdarkensla**

Tá fleiri eru saman um eina negativa ella destruktiva gerð, minkar kenslan av ábyrgd og samvitsku tilsvarandi.

Vanlig hugsan verður sett til viks, og tað verður fylgt við streyminum. Soleiðis kann ein næmingur gera eina ónda gerð, uttan sjálvur at

vera óndur. Hann er í einari position í felagsskapinum, sum brúkar ein oyðileggjandi samveruhátt, sum gerst eitt mynstur.

Sostatt er ikki talan um óndar næmingar, men ónd mynstur. Tey vaksnu kunnu ikki broyta børn, men tey kunnu broyta mynstur.

*"Eg havi ikki happað á snapchat. Eg havi sent nakrar myndir, men tað hava tey flestu."*

**Empati**

At vera raktur av happing er altíð pínufult, og avleiðingarnar kunnu vera langdrignar og álvarsamar, serliga tá happingin heldur fram. Í paradigmu 1, har hugsað verður í orsøk og virking, verður ein happari funnin, sum kann verða skýrdur onki empati at hava. Tað er tó heilt sjáldsamt, at børn ikki hava empati. Heldur er tað so, at børn, sum eru fangað í einum oyðileggjandi mynstri, sum happing er, kunnu koma í eina støðu av selektivum empati. Trongdin at vera íroknaður í felagsskapin kann seta vælment empati til viks fyri at yvirliva sosialt. Tískil er venjing í empati ikki ein loysn mótvegis happing, tí hon sendir boð um, at okkurt er galið við barninum, og harvið er trupulleikin tikin út úr samanhanginum.

Tá happingin vaksur, verður eginleikin til empati ta løtuna avmarkaður til bara at hava fokus á tað, sum kann raka og eyðmýkja. Hetta fyribrigdið kallast abjektión. Við at abjisera, gerst tað, sum er frástoytt og tillátursgjørt, fremmant. Og tað fremmanda hava vit menniskju lættari at taka frástøðu frá enn tað, sum er ein partur av okkum. Hetta kann gera støðuna fyri tann útstoytta næmingin púra fastlæsta.

*"Vit høvdu einaferð ein drong í flokkinum, sum var illa happaður. Hann var ofta ræðuliga illur. Hann kláraði ikki at stýra sær."*

***"Longing for belonging"***
**Happing sum bólkafyribrigdi**

Vit siga ofta, at børn ganga í skúla. Tey eru í skúla. Skúlin er eitt stað, har næmingar eru settir at vera og hava tískil eisini eina væntan um at trívast har í felagsskapinum.

Felags triði hjá næmingunum skal vera er skúlafelagsskapurin. Í einhvørjum bólki eru tað formel og óformel viðurskifti. Soleiðis eisini í einum skúlaflokki. Í skúlanum eru næmingar formelt tengdir at hvørjum øðrum. Teir eru settir at vera har við tí formella endamálinum, sum skúlin hevur. Tímatalva, lærugreinir, fríkorter, bøkur, skúlating eru alt formel viðurskifti (artefaktar), sum næmingarnir hava í felag. Hesi viðurskifti eru við til at tryggja formella sosialitetin. Hann er tó ikki eina um at tryggja felagsskapin í flokkinum. Fyri at trívast saman, koyra óformellu prosessirnar samstundis, so at næmingarnir kunnu fáa neyðturviligu *vit*-kensluna. Javnvágur millum tað formella og tað óformella í skúlanum tryggjar *vit*-kensluna. Tá ójavnvágur er millum hesi bæði viðurskiftini, vantar felags triði, og happing gerst snúningspunktið í skúlafelagsskapinum í strembanini at hoyra til. Tað vil siga, at happing gerst felags triði, sum lýst í Mynd 3.

*"Vit, sum flokkur, goyma ting, men tað er bara sovorðið, sum vit flenna eftir. Ein blívur happað av at vera so snedig. Hon hevur tað ikki gott."*

Næmingurin er also sambært hesari hugsan í tveimum skúlum: tí formella, har hann skal luttaka í undirvísingini, og tí óformella, har hann skal verða til sum næmingur í *vit*-felagsskapinum. Í báðum skúlunum fer ein meting av næminginum fram. Í formella skúlanum verður fakligur førleiki og eginleiki at tillaga seg krøv hjá skúlanum mett, meðan eginleikin sum góðtikin ella ikki-góðtikin næmingur og vinur verður mettur í óformella skúlanum.

*"Eg vil ikki blíva happað, sum eg blívi næstan altíð."*

Vit menniskju streva altíð eftir meining. Hvussu kann tað geva meining fyri næmingin at vera í skúla? Næmingurin strevar eftir meining millum báðar skúlarnar. Tann formella og óformella skúlan. Luttaka í undirvísingini og verða til sum luttakandi næmingur saman við floksfeløgum og vinum í einum næmingur-*vit*-felagsskapi.

Í tí óformella royna næmingarnir hvør sær og saman at finna útav, hvussu og hvat skal til fyri at vera í bólkinum, felagsskapinum. Hetta er eitt slag av samráðing, sum fer fram alla tíðina, og sum verður gjørt beinleiðis og óbeinleiðis gjøgnum samskifti og mátar at vera saman uppá. Hetta er ein balansugongd, og tá flokkurin ikki megnar at skapa nøktandi felagsskapir, kemur kreppa í.

*"Í 2. flokki fingu vit ein nýggjan drong í flokkin. Hann var sera sjálvglaður og sjálvsikkur. Vit happaðu hann, eg veit ikki ordiliga hví. Hann argaði sjálvur nógv, so ongin tímdi at hjálpa honum. Hann skifti seinni skúla."*

Hendan kreppan elvir til *"longing for belonging"* ella longsul eftir at hoyra til. Í hesari fatanini er happing tekin um longsul eftir at hoyra til. Soleiðis er happing ikki bara líðing fyri tann rakta, men eisini snúningspunktið í skúlafelagsskapinum, tað felags triðja hjá næmingunum.

Belonging snýr seg um at hoyra til, sum felagsskap, eina *vit*-kenslu. Longing snýr seg um tráan og tørv. Longing for belonging er soleiðis eitt dynamiskt samspæl millum felagsskap og einstakling. Vit kunnu síggja hetta soleiðis, at happing nøktar ítøkiliga tørvin á skúlafelagsskapi, har hesin er vantandi, og í og við happingini verða nýggir felagsskapir gjørdir. Eitt óformelt sosialt system verður skapt, har tað snýr seg um vit og tit.

*"Í okkara flokki eru næstan altíð ein ella tveir næmingar, sum hava tað ræðuliga ringt, men teir velja ikki at siga frá."*

Tað vil siga, at tá formelli sosiali skúlafelagsskapurin ikki nøktar tørvin at hoyra til, tekur óformella systemið við = happing.

**Okkara útgangsstøðið**

Frá hugsanarháttinum, at happing snýr seg um einstaklingin, hava vit flutt okkum til eina paradigmi, ið sær happing sum eitt sosialt fyribrigdi. Eitt mynstur, sum er bygt upp av nógvum ymiskum viðvirkandi lutum innanhýsis og uttanhýsis frá. Tá meirframleiðsla er av andstygd, og framleiðsla av tign er í undirluta, er happing.

Happing snýr seg um útihýsing (eksklusión) og innivist (inklusión) í sosiala felagsskapinum. Tá happing er, verður ábyrgdarkensla og empati sett til viks, og látur, forteljingar og forkláringar vera brúktar at legitimera særandi útsagnir, hendingar ella gerðir.

Øll menniskju hava tørv á at hoyra til, at hava eina vit-kenslu. Tá longsulin eftir at vera partur av felagsskapinum ikki verður nøktaður, tekur happing seg upp.

Við hesum hugsanarhátti í skjáttuni fóru vit undir at gera spurnarblaðið, ið er brúkt til hesa kanning. Spurningarnir eru skipaðir soleiðis, at teir skuldu kunna geva okkum eitt breitt innlit í atferð og hugsan næminganna, bæði í sambandi við persónligar upplivingar, men eisini í tí skúlafelagsskapi tey eru partur av.

Úrslitið bleiv eitt spurnablað við 40 spurningum, harav teir seinastu góvu næmingunum høvi at siga frá egnum upplivingum um happing. Tað eru nakrar av hesum viðmerkingum, ið standa í klombrum ymsa staðni í frágreiðingini.

*"Eg haldi, at tað verður gjørt ov lítið við, tá ein lærari happar. Fyrilestrar og annað er altíð um, tá ið ein næmingur happar ein annan næming."*

**Felags triði**




**Mynd 3**

# 2. Partur

## Happing í tølum og talvum

Í hesum partinum viðgera vit úrslit frá spurnakanningini. Endamálið er fyrst og fremst at staðfesta, hvussu umfatandi happing er, og hvat eyðkennir happing í føroysku skúlunum. Vit koma at skipa greiningina sum víst niðanfyri. Í fyrsta umfari verða talvur og úrslit lýst hvørt sær. Í 4. parti viðgera vit nøkur av hesum úrslitum neyvari og í einum breiðari fakligum samanhangi.

1. Happing í mongd.
2. Happing, trivnaður og ótti.
3. Hvussu fer happingin fram?
4. Hvar verður happað?
5. Hvat ger skúlin við happing?
6. Samanbering við kanning frá 2007

Teir fyrstu spurningarnir í spurnablaðnum snúðu seg um trivnað, ið vit koma at viðgera seinni í hesum parti. Tað var ikki fyrrenn í 6. spurningi, at næmingarnir vóru spurdir: ert tú happað/ur í skúlanum? Møguleiki var at svara; nei; ja, viðhvørt; ja, ofta og ja, fyrr, men ikki longur.

*”Eg var bangin, tá tað var myrkt, tí teir vóru altíð eftir mær. Eg var feitur og ófantaligur fyrr. Blívi ikki happaður longur, var mest tá eg gekk í 1.-6. flokk”*

Tað var, tá vit royndu spurnablaðið undan kanningini, at næmingarnir vístu okkum á tørvin at sleppa at raðfesta, viðhvørt og ofta, og fyrr men ikki longur. Grundgevingin hjá næmingunum var, at happing flytur seg, kann taka seg upp og hvørva aftur, hon kann eisini vera áhaldandi, og onkuntíð steðgar hon heilt. Men hevur man verið fyri happing, situr upplivingin har, hóast happingin er steðgað.

*”Eg flutti, tá eg var í 3. flokki, og í 4. flokki byrjaði tað, og steðgaði ikki aftur fyrr enn í 7. flokki. Tey hava umringað meg, farin illa við tingum hjá mær, rópt ljót orð og nøvn eftir mær, hildið meg illa uttanfyri, flent, peikað og mangt, mangt annað. Eg havi enn sálarligar trupulleikar av hesum”.*

Tað vil altíð vera ein ávís óvissa í tølunum, tí tað kunnu vera næmingar, ið eru ivasamir um tað, sum teir hava upplivað, er happing, og tí svara

*”Nógv eru og hyggja at og happa.”*

antin nei ella ja. Men svørini upp á aðrar spurningar í kanningini, og úrslitini samanløgd, benda á, at samlaða myndin er eftirfarandi. Eitt nú síggja vit í gjøgnumgongd av viðmerkingum, at næmingar, ið lýsa happing, teir hava verið fyri, hava svarað nei upp á spurningin, ert tú happað/ur?

*“Eg havi ikki verið happað, men eg havi ongar vinir. Eg havi tó tveir vinir, men teir ganga ikki í mínum skúla. Eg eri nógv einsamøll í fríkorterunum.”*

### 2.1 Happing og mongd

Samanlagt eru 13% av næmingunum í okkara fólkaskúla útsettir fyri happing. Hetta svarar til 236 næmingar. Umframt hesi eru tað 24%, ið er 440 næmingar, sum hava upplivað happing í teirra skúlatíð, sí mynd 4.

**Eg happi eisini**

Talið á teimum, sum hava verið við til at happað, er 16%, og tey gera tað einsamøll ella saman við øðrum. Vit góvu næmingunum høvi eisini at svara ja, men bara saman við øðrum. Henda seinna møguleika valdu 8% at brúka. Mynd 5,

Tað kann vera trupult fyri ein næming at viðganga at vera ein, sum happar, og av tí at happ-

| Ert tú vorðin happað/ur í skúlanum? | | |
|---|---|---|
| | Tal | í % |
| Nei | 1176 | 63 |
| Ja, viðhvørt | 193 | 11 |
| Ja, ofta | 43 | 2 |
| Ja, fyrr, men ikki longur | 440 | 24 |
| N=1852 (1995-143) | | |

**Mynd 4.**

| Hevur tú verið við til at happa? | | |
|---|---|---|
| | Tal | í % |
| Nei | 1221 | 67 |
| Sjáldan | 292 | 17 |
| Ja, men bara saman við øðrum | 154 | 8 |
| Ja | 138 | 8 |
| N=1832 (1995-163) | | |

**Mynd 5.**

ing í stóran mun vísir seg at vera eitt bólkafyribrigdi, var hesin svarmøguleiki neyðugur. Umframt tey 16%, ið happa, eru tað onnur 17%, sum siga, at tey happa, men gera tað sjáldan.

*"Eg gangi við teimum, sum happa, men eg geri einki".*

## Happing samanlagt

Samanbera vit tølini í mynd 2.1. og mynd 2.2 og hyggja, hvussu nógv siga, at tey ikki eru happað, og hvussu nógv siga, at tey ikki happa, liggur tað um 65%, meðan uml. 35% á onkran hátt eru partar av happing. Hetta eru høg tøl, ið siga okkum, at talan er um ein trupulleika.

Happing er ein sera samansettur trupulleiki, og tað vísir lagkøkan Mynd 6. okkum eisini. Myndin vísir júst tað, sum næmingarnir nevndu í forkanningini, at happing er nakað, ið flytur seg. Fyri summi er hon har alla tíðina, meðan onnur uppliva, at happingin kemur og fer, og onkur, sum verður happaður, er eisini sjálv/ur við til at happa.

*"Tá tú ert happaður, heldur tú, at hvis tú fert at happa onnur, verða tínir happarar betri við teg. Tað er skeivt!"*

Lagkøkan, mynd 6. vísir, at 47% av næming–unum ikki hava upplivað happing í skúlanum. Hetta tí 16% happa, 6% verða happað, og 7% eru í dupultari støðu, tí tey bæði verða happað og eru við til at happa.So eru tað 13%, sum hava happað fyrr, og 11%, sum eru í dupultari støðu, at hava happað fyrr og eru happað fyrr, men ikki longur.

Við støði í lagkøkuni kunnu vit eisini staðfesta, at 71% av næmingunum í løtuni eru uttanfyri happing. Hetta tal byggir á samlaða talið á spurd–um, ið er 1995 næmingar. Í eXbus granskingini nevna tey ta dupultstøðuna, sum mong eru í, t.v.s. at tað er ikki óvanligt, at næmingar uppliva hetta. Vit síggja tað eisini í tí, sum næmingar skriva, m.a. at tey vóru happað, og síðani fóru at happa.

*"Man følir seg illa, aftaná man hevur verið við til at happa, og hevur tað eisini ringt, tá ein sjálvur blívur happaður".*

## Kyn

Tað eru dreingirnir, ið oftast verða útsettir fyri happing. Og tað eru dreingir, sum oftast eru við til at happa. Mynd 8. Her síggja vit, at 15% av dreingjunum verða happaðir við hvørt og ofta, meðan talið er 11% hjá gentunum.




**Mynd 6.** N=1995

| Ert tú vorðin happað/ur í skúlanum? - sb.v.kyn (í %) | Nei | Ja, viðhvørt | Ja, ofta | Ja, fyrr, men ikki longur | |
|---|---|---|---|---|---|
| Genta | 64 | 9 | 2 | 25 | 100% |
| Drongur | 63 | 12 | 3 | 23 | 100% |
| N=1851 | | | | | |

**Mynd 7.**

| Hevur tú verið við til at happa? - sb.v.kyn % | Ja | Ja, viðhvørt | ja, ofta | Ja, men bara saman við øðrum | Nei | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Genta | 5 | 12 | 0 | 7 | 76 | 100% |
| Drongur | 9 | 23 | 1 | 10 | 58 | 100% |
| N=1831 | | | | | | |

**Mynd 8.**

Heili 24% av dreingjunum, siga, at teir hava verið við til at happa, meðan 12% av gentunum siga tað sama. Hvør orsøkin er til hetta kynsbýtið, kunnu vit ikki lesa út úr hesi kanningini, men hetta samsvarar væl við tað, tey uppliva í okkara grannalondum, og verður umrøtt í eXbus granskingini. Her siga tey m.a., at tað ikki er gjørligt enn at siga, hvør orsøkin er, men tað kann hava samband við hugin hjá dreingjum at ganga í skúla.

*"Í hinum skúlanum bleiv eg happað, tí eg var lítil, og tað var ein genta og nógvir dreingir."*

**Hvør happar hvønn?**
Happing fer mest fram millum ein ella fleiri næmingar í flokkinum. Men tað sæst samstundis, at tað heldur ikki er óvanligt, at næmingar úr øðrum flokkum luttaka. Henda støða er eins fyri dreingir og gentur. Hetta stuðlar eisini undir tað, at mesta happingin fer fram í skúlagarðinum og í flokshølinum, sum sæst í næsta parti.

Hyggja vit at kynsbýtinum, mynd 9., síggja vit, at tað serliga eru gentur, ið happa gentur, men tær siga eisini, at tær verða happaðar av bæði gentum og dreingjum. Dreingir uppliva mest, at tað er ein ella fleiri dreingir, sum happa teir, men tað eru fáir, sum uppliva, at teir vera happaðir av gentu.

**Lærarin happar**
Sum tað sæst á myndini Mynd 9., eru tað næmingar, ið siga, at lærarin happar. Tað eru flest gentur, ið uppliva hetta. Talan er um 63% av gentunum og 37% av dreingjunum, ið eru fyri happing, (41 næmingar), ið hava upplivað, at lærarin happar. Umframt hetta eru tað 17 næmingar, ið siga, at onnur vaksin í skúlanum happa.

*“Ein av okkara lærarum hevur happað hetta seinasta hálvárið, hann segði ymiskt, t.d. eg var ljót, óklók og ymiskt annað. Eg havi sagt tað við mammu mína, tí til seinast bleiv eg sera kedd av hasum. Hon ringdi til læraran, og nú tosar hann ikki við meg. Tá ið lærarin sigur sovorðið, byrjaðu næmingarnir at siga tað sama við meg”.*

**Happing og flokkar**
Tá umræður floksstig, so fer mesta happingin fram í 5. flokkunum, og síðani minkar hon. Mynd 10.

Í 5. flokki siga 18%, at tey hava upplivað happing viðhvørt og ofta. Í 7. flokki eru tað 10%, og í 9. flokki er talan um 7%. Hetta kan tulkast sum, at happing minkar við aldrinum.

*”Eg sá, at nakrir dreingir happaðu ein í 1. flokki við at taka mynd av honum og senda tað út á Snapchat”.*

Hyggja vit nærri at mynd 10., síggja vit, at eitt nú 20% av næmingunum í 5. flokki hava verið fyri happing fyrr, men ikki longur. Fyri 7. flokkarnar er talan um 22% og í 9. flokkunum 28%. Hetta vísir, at happing, sum áður nevnt, flytur seg, og kann fyri summi byrja longu í 1. flokki, ella, sum røddir eru frammi um, at happing byrjar longu í barnagørðunum. Hetta merkir, at tað eigur at takast atlit at happing, sum ein møguleiki longu í innskúlingini og tey fyrstu skúlaárini.

| Hvør hevur happað teg? (í %) | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | Genta | Drongur | | N= |
| Mest ein næmingur í mínum flokki | 56 | 44 | 100 | 261 |
| Fleiri næmingar í mínum flokki | 64 | 36 | 100 | 177 |
| Næmingar í øðrum flokkum | 44 | 56 | 100 | 233 |
| Lærari | 63 | 37 | 100 | 41 |
| Onnur vaksin í skúlanum | 53 | 47 | 100 | 17 |
| N= 729 | | | | |
| **Ert tú happað/ur av dreingjum ella gentum? (í %)** | | | | |
| | Genta | Drongur | | N= |
| Mest av einari gentu | 75 | 25 | 100 | 109 |
| Av fleiri gentum | 85 | 15 | 100 | 52 |
| Mest av einum drongi | 40 | 60 | 100 | 192 |
| Av fleiri dreingjum | 38 | 62 | 100 | 153 |
| Av bæði gentum og dreingjum | 69 | 31 | 100 | 143 |
| N= 649 | | | | |

**Mynd 9.**

| Ert tú vorðin happað/ur í skúlanum? - og flokkar (í%) | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Nei | Ja, viðhvørt | Ja, ofta | Ja, fyrr, men ikki longur | |
| 5. flokkur | 61 | 15 | 4 | 21 | 100 |
| 7. flokkur | 67 | 9 | 2 | 22 | 100 |
| 9. flokkur | 63 | 7 | 2 | 29 | 100 |
| N=1850 | | | | | |

**Mynd 10.**

*”Eg havi ein beiggja, sum er happaður frá 1.-7. flokk. Hann bleiv kallaður ymiskt og bleiv sligin og annað. Happingin steðgaði, tá hann fór til xxx at ganga í skúla, men hann hevur tað ringt enn, hann broyttist fullstendiga sum persónur”.*

**Tey í 9. flokki happa mest**
Vit síggja omanfyri, at tað eru tey, sum ganga í 5. flokkunum, ið eru mest útsett fyri at vera happ–að. Men hyggja vit at tølunum, sum vísa tey, sum happa, síggja vit, at tað eru 9. flokkarnir sum happa mest.

Hyggja vit at samlaða talinum fyri tey, sum happa, happa viðhvørt, ofta og bara saman við øðrum, er talan um 41%. 7. flokkarnir koma næst við 35% og til seinast 5. flokkarnir við 25%. Tað er eingin í nøkrum aldursbólki, sum sigur seg at

| Ert tú vorðin happað/ur í skúlanum? Og støðd á skúlum (í%) | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | Nei | viðhvørt | Ja, ofta | Ja, fyrr men ikki longur |
| 1-99 børn | 57 | 14 | 4 | 25 |
| 100-299 børn | 69 | 10 | 2 | 19 |
| 300 og fleiri børn | 64 | 10 | 1 | 25 |
| N= 1639 | | | | |

**Mynd 11.**




**Mynd 12.** N=1848




**Mynd 13.** N=1848

*"Ein drongur læsti eina gentu í flokkinum inn í eitt skáp. Hon flutti flokk".*

| Hvussu tírvist tú í skúlanum? - í mun til kyn (í%) | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Sera væl | Væl | Hvørki væl ella illa | Illa | Sera illa |
| Genta | 41 | 46 | 11 | 2 | 0 |
| Drongur | 40 | 48 | 10 | 2 | 1 |
| N=1859 | | | | | |

**Mynd 14.**

happa ofta, men halda seg til avmarkingina sjáldan. Vit kunnu ikki við støði í hesi kanning siga, hvør orsøkin er til hetta býtið millum aldursbólkarnar, men tað kann tykjast, sum tað eru tey í 9. og 7. flokki, sum happa tey í 5. flokki. Hetta er helst ikki so, heldur er tað aldursmunurin, sum spælir inn her, tí tað kann hugsast, at tey, sum ganga í 5. flokki, ikki í eins stóran mun, sum tey eldru, kunnu viðurkenna, at tey eru við til at happa.

### Happing og støðd á skúla

Av tí at henda kanning ikki skal viðgera happing á einstøku skúlunum, men greinar happing í breiðari høpi, eru skúlarnir ikki eyðmerktir hvør sær, men koyrdir í tríggjar bólkar. Smáir skúlar 1-99 næmingar, miðalstórir skúlar 100-299 næmingar, og stórir skúlar 300 næmingar og fleiri.

Sum sæst á Mynd 11., er støddin á skúlunum ikki avgerandi, tá tað kemur til happing, tí munurin millum skúlarnar er sera lítil.

## 2.2 Happing og trivnaður

Spurningurin um trivnað vísir, at 82% av næmingunum trívast væl ella sera væl. 10% trívast hvørki væl ella illa, og 3% trívast illa ella sera illa. Fyrst hyggja vit at spurninginum um at vera happaður og at trívast, síðani eftir støðuni hjá teimum, sum eru við til at happa. Harnæst seta vit trivnað inn í aðrar samanhangir, eitt nú trivnað og kyn, aldur, vinir o.a.

Fyrsta myndin, vit hyggja at, er, hvussu tey, sum eru fyri happing, trívast. Her síggja vit greitt á mynd 13., at næmingar, ið hava verið fyri happing, trívast illa og sera illa, í mun til tey, sum ikki

| Hvussu trívist tú í skúlanum? - í mun til flokkar (í%) | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Sera væl | Væl | Hvørki væl ella illa | Illa | Sera illa |
| 5. flokkur | 39 | 46 | 12 | 2 | 0 |
| 7. flokkur | 45 | 44 | 9 | 2 | 1 |
| 9. flokkur | 38 | 50 | 10 | 2 | 1 |
| N=1858 | | | | | |

**Mynd 15.**

| Hvussu trívist tú í skúlanum? - í mun til støðd á skúla? | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Næmingar | Sera væl | Væl | Hvørki væl ella illa | Illa | Sera illa |
| 1-199 | 33 | 51 | 12 | 2 | 1 |
| 100-299 | 36 | 52 | 10 | 2 | 1 |
| 300 og fleiri | 44 | 44 | 10 | 2 | 0 |
| N= 1644 | | | | | % |

**Mynd 16.**

eru happað. Av teimum, sum ikki eru happað, trívast 94% væl og sera væl, meðan einans 46% av teimum, sum ofta eru fyri happing, kunnu siga tað sama. Av teimum, sum ikki eru happað, sigur einans 1%, at tey trívast illa, meðan 26% av teim–um, sum á onkran hátt hava verið fyri happing, siga, at tey trívast illa og sera illa.

*"Tað barnið, sum verður happað, hevur tað sjálvandi ikki gott, men tey, sum hava happað, hava tað heldur ikki so gott, tá tey hugsa um, hvat tey hava gjørt".*

Mynd 12. vísir, hvussu týdningarmikið tað er fyri trivnaðin í fólkaskúlunum kring landið, at næming-ar ikki vera fyri happing. Men tað er ikki happing einsamalt, ið skapar mistrivnað í skúlunum, sæð í mun til talið á teimum, sum hvørki trívast væl ella illa, illa og sera illa, men henda kanningin kann ikki geva okkum svar uppá, hvat liggur aftanfyri hesi tølini, og hetta er heldur ikki ein partur av okkara uppgávu. Tey, sum happa, tykjast heldur ikki at trívast væl. Hyggja vit at myndini 13., sæst, at tey flestu, ið eru við til at happa, trívast hvørki væl ella illa. Samstundis síggja vit, at sama støðan er galdandi fyri tey, sum ikki eru við til at happa.

**Trivnaður - kyn, flokkar og stødd á skúla**

Tað er ikki nakar sjónligur munur millum trivnað og kyn, trivnað og flokkar ella trivnað og stødd á skúla, tí vit síggja eitt sera javnt býti millum allar hesar bólkingar. Tað verður ofta borið upp á mál, at dreingir ikki trívast eins væl í skúlanum og gentur, men henda kanning vísir ikki hetta. Mynd 14.,15., 16. *(niðast á síðu 20)*

Hetta sigur okkum, at spurningurin um at trívast í skúlanum skal finnast í øðrum viðurskiftum enn hesum omanfyri nevndu.

**Trivnaður og at duga væl ella illa**

Tað er ikki fyrr enn vit koma til henda spurning, at vit síggja nakran sjónligan mun millum tað at trívast og í hesum førinum, at trívast í mun til tað at duga fakliga væl ella illa í skúlanum.

Teir flestu næmingarnir, ið eru spurdir, hvussu teir duga fakliga í skúlanum, hava svarað væl, ella hvørki væl ella illa. Teir vóru í hesum føri bidnir um sjálvir at meta um sítt fakliga støði. Men samanbera vit støðuna við spurningin at trívast í skúlanum, fáa vit hesa myndina. Mynd 18.




**Mynd 17.** N=1834

Her síggja vit, at 38%, ið trívast illa og sera illa, halda seg eisini duga illa og sera illa. Eitt annað, sum eisini er vert at leggja merki til, er, at 13% av teimum, sum trívast sera illa, siga, at tey duga sera væl. Tað mest eyðsýnda í hesum tølum er, at tey flestu t.v.s. 86%, sum trívast sera væl og væl, eisini siga, at tey duga sera væl og væl. Hetta lýsir vitanina um, at trivnaður og læring eru tvær síður av somu søk.

Taka vit spurningin um at duga væl ella illa í skúlanum og meta hann saman við kyn, síggja vit, at dreingir og gentur ligga ógvuliga nær hvørjum øðrum, tó við undantaki av, at fleiri dreingir enn gentur siga seg at duga stak illa. Mynd 17. Henda myndin passar væl saman við




**Mynd 18.** N=1830

henni, sum vísir, hvussu dreingir og gentur trívast í skúlanum. Har var støðan eisini sera lík hesari.

**Trivnaðurin og vinir í skúlanum**

Tað er, sum væntað, eitt neyvt samband millum at trívast í skúlanum og at hava vinir. Vit settu næmingunum spurningin um at hava vinir í flokkinum, og í øðrum flokkum og hava sett hesar spurningar saman við spurninginum um at trívast,

Úrslitið av hesi samankoyringini vísir, at tey, sum trívast sera væl, væl og hvørki væl ella illa, hava øll fleiri vinir í egnum flokki og í øðrum flokkum. Tey, sum hava ein vin ella ongan vin, eru tey, sum trívast illa og sera illa.

Taka vit hesa støðuna og samanbera hana við spurningin um happing, so vísa tey tølini, at tey, sum vera happað í skúlanum, eisini trívast illa. Bera vit hetta saman við spurningin um vinir og trivnað, kunnu vit útleiða, at tey, sum eru fyri happing, sannlíkt hava fáar vinir í skúlanum.

**Floksmentan og happing**

Fyri at kanna um samanhangur er ímillum floksmentan og happing, valdu vit at spyrja næmingarnar, í hvønn mun ymisk viðurskifti vóru galdandi fyri teirra flokk. Kanningin vísir, at tað er týðiligur samanhangur millum ávís viðurskifti í flokkinum og happing. Mynd 19.

1. ***Í flokkum, har næmingarnir oftari halda saman, eru færri útsett fyri happing.*** 10% av teimum spurdu siga, at tey í teirra flokki altíð halda saman. Av hesum 10% siga 25% happað og 75% ikki happað. Hyggja vit eftir talvuni, síggja vit, at tað eru fleiri, sum eru happað í flokkum, har tey viðhvørt, sjáldan ella ongantíð halda saman.
2. ***Í flokkum, har tey oftari fáa at vita, at tey eru ein góður flokkur, er minni happing.*** Vit síggja her, at 18% av teimum spurdu siga, at tey altíd fáa at vita, at tey eru ein góður flokkur. Av hesum siga 33%, at tey eru happað, og 67% at tey ikki eru happað.
3. ***Í flokkum, har tað oftari er arbeidsfriður, er minni happing.*** 5% av øllum meta, at tað alíð er arbeiðsfriður í flokkinum. Av hesum 5% eru 62% ikki happað, meðan 38% eru happað. Her er eisini greiður samanhangur. Niðast á talvuni síggja vit, at av teimum 5%, sum meta, at tað ongantíð er arbeiðsfriður, verða 57% happað, meðan 43% verða ikki happað.

**Í okkara flokki halda vit saman!**

| | Ikki happað | Happað | Happað fyrr, men ikki longur | % | Øll |
|---|---|---|---|---|---|
| Ja, altíð | 75 | 7 | 18 | 100 | 10% |
| Ja, sum oftast | 68 | 10 | 22 | 100 | 51% |
| Ja viðhvørt | 55 | 19 | 26 | 100 | 28% |
| Sjáldan | 53 | 15 | 32 | 100 | 9% |
| Ongantíð | 56 | 24 | 21 | 100 | 2% |
| N= 1842 | | | | | |

**ı okkara flokki fáa vit at vita, at vit eru ein góður flokku**

| | Ikki happað | Happað | Happað fyrr, men ikki longur | % | Øll |
|---|---|---|---|---|---|
| Ja, altíð | 67 | 12 | 21 | 100 | 18% |
| Ja, sum oftast | 66 | 10 | 24 | 100 | 32% |
| Ja viðhvørt | 65 | 13 | 22 | 100 | 30% |
| Sjáldan | 55 | 18 | 27 | 100 | 14% |
| Ongantíð | 51 | 20 | 29 | 100 | 6% |
| N= 1844 | | | | | |

**Í okkara flokki er arbeiðsfriður!**

| | Ikki happað | Happað | Happað fyrr, men ikki longur | % | Øll |
|---|---|---|---|---|---|
| Ja, altíð | 62 | 15 | 22 | 100 | 5% |
| Ja, sum oftast | 71 | 8 | 21 | 100 | 32% |
| Ja viðhvørt | 65 | 11 | 23 | 100 | 35% |
| Sjáldan | 56 | 17 | 27 | 100 | 23% |
| Ongantíð | 43 | 30 | 27 | 100 | 5% |
| N= 1829 | | | | | |

**Í okkara flokki trívast øll!**

| | Ikki happað | Happað | Happað fyrr, men ikki longur | % | Øll |
|---|---|---|---|---|---|
| Ja, altíð | 78 | 4 | 17 | 100 | 18% |
| Ja, sum oftast | 67 | 10 | 24 | 100 | 51% |
| Ja viðhvørt | 52 | 22 | 26 | 100 | 22% |
| Sjáldan | 41 | 30 | 29 | 100 | 6% |
| Ongantíð | 58 | 16 | 25 | 100 | 3% |
| N= 1787 | | | | | |

**Í okkara flokki er gott at vera!**

| | Ikki happað | Happað | Happað fyrr, men ikki longur | % | Øll |
|---|---|---|---|---|---|
| Ja, altíð | 75 | 6 | 19 | 100 | 38% |
| Ja, sum oftast | 63 | 12 | 25 | 100 | 44% |
| Ja viðhvørt | 43 | 27 | 30 | 100 | 13% |
| Sjáldan | 39 | 31 | 31 | 100 | 4% |
| Ongantíð | 54 | 25 | 21 | 100 | 1% |
| N= 1805 | | | | | |

**Í okkara flokki er øll vinir!**

| | Ikki happað | Happað | Happað fyrr, men ikki longur | % | Øll |
|---|---|---|---|---|---|
| Ja, altíð | 70 | 9 | 22 | 100 | 29% |
| Ja, sum oftast | 66 | 11 | 23 | 100 | 43% |
| Ja viðhvørt | 57 | 16 | 27 | 100 | 15% |
| Sjáldan | 48 | 26 | 26 | 100 | 8% |
| Ongantíð | 42 | 24 | 34 | 100 | 5% |
| N= 1785 | | | | | |

**Mynd 19a,b,c,d,f**

4. ***Í flokkum, har øll oftari trívast, er minni happing. 18% av teimum spurdu meta, at øll trívast í teirra flokki.*** Av hesum eru tað 78%, sum ikki verða happað, og 22% sum verða ella hava verið happað. Vit síggja, at greiður samanhangur er millum, hvussu ofta næmingar meta, at øll trívast, og hvussu nógv eru happað í flokkinum.
5. ***Í flokkum, har tað oftari er gott at vera, er minni happing.*** 38% svaraðu, at tað er gott at vera í teirra flokki. Av hesum verða 75% ikki happað, meðan 25% verða happað. Í flokkum, har tað sjáldan ella ongantíð er gott at vera, eru fleiri happað.
6. ***Í flokkum, har næmingar, ið oftari eru vinir, er minni happing.*** 29% svaraðu, at í teirra flokki eru øll altíð vinir. Av hesum eru 70% ikki happað og 30% happað. Eisini her síggja vit samanhang millum eina góða flokksmentan og happing.

Hetta er í tráð við granskingina hjá eXbus bólkinum, navnliga longsulin eftir at hoyra til.

## At bera ótta fyri happing

At bera ótta í skúlanum er eitt álvarsamt mál, og henda kanning vísir, at tað eru nógvir næmingar, sum ganga við ótta fyri at blíva happaðir ella við ótta fyri ikki at sleppa upp í felagsskapin í skúl–anum. Her er ikki bert talan um tey, sum eru fyri happing, ella eru við til at happa, men um allar næmingarnar í spurnakanningini.

Sum sæst í mynd 21., eru tey, sum eru happað, eisini bangin fyri at blíva happa, men teir næm–ingar, sum happa, eisini eru bangnir. Eitt nú sæst, at av teimum, sum siga, at tey eru við til at happa,




**Mynd 25.** N=1835

| Er tú bangin fyri at verða happað/ur ? | | |
|---|---|---|
| | % av øllum | Tal |
| Ongantíð | 47 | 945 |
| Sjáldan | 23 | 450 |
| Viðhvørt | 14 | 272 |
| Eitt sindur ofta | 3 | 62 |
| Ofta | 2 | 43 |
| Sera ofta | 2 | 29 |
| Ikki svarað | 10 | 194 |
| N= 1995 | | |

**Mynd 20.**

| Er tú bangin fyri at vera happað/ur? - Ert tú vorðin happað/ur í skúlanum? | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Ongantíð | Sjáldan | Viðhvørt | Ofta | Sera ofta |
| Nei | 63 | 24 | 10 | 1 | 1 |
| Ja, viðhvørt | 28 | 25 | 31 | 9 | 5 |
| Ja, ofta | 19.5 | 12 | 22 | 20 | 12 |
| Ja, fyrr men ikki longur | 40 | 29 | 19 | 5 | 4 |
| N=1788 | | | | | % |

**Mynd 21.**

| Er tú bangin fyri at vera happað/ur? -Hevur tú veri við til at happa? % | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Ongantíð | Sjáldan | Viðhvørt | Ofta | Sera ofta |
| Nei | 55 | 24 | 13 | 3 | 4 |
| Ja, viðhvørt | 45 | 29 | 19 | 4 | 4 |
| Ja, ofta | 17 | 33 | 17 | 0 | 33 |
| Ja, men bara saman við øðrum | 46 | 26 | 17 | 7 | 5 |
| N=1788 | | | | | |

**Mynd 22.**

| Ert tú bangin fyri at verða happað/ur - í mun til kyn (%) | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Ongantíð | Sjáldan | Viðhvørt | sindur ofta | Sera ofta |
| Genta | 42 | 27 | 21 | 4 | 3 |
| Drongur | 63 | 23 | 9 | 2 | 1 |
| N=1800 | | | | | |

**Mynd 23.**

| Ert tú bangin fyri at verða happað/ur - í mun til flokk (%) | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Ongantíð | Sjáldan | Viðhvørt | sindur ofta | Sera ofta |
| 5. flokkur | 51 | 24 | 14 | 5 | 2 |
| 7. flokkur | 52 | 25 | 17 | 2 | 1 |
| 9. flokkur | 55 | 26 | 15 | 2 | 1 |
| N=1799 | | | | | |

**Mynd 24.**

eru 39% eitt sindur ofta bangin, 33% eru ofta bangin, og 36% eru sera ofta bangin

Sum vit síggja í Mynd 20., eru tað 406 frá viðhvørt til sera ofta, ella 20% av samlaðu næm–ingunum í fólkaskúlanum, ið siga, at teir bera ótta fyri at vera útsettir fyri happing. Umframt hesi eru tað uml. 450 ella 22%, sum siga, at tey hava henda óttan, men at tað er sjáldan. (Her hava 1801 av 1995 svarað). Hyggja vit at fyribrigdinum ótti í sambandi við kyn, síggja vit ikki tann stóra munin, men genturnar eru tó eitt sindur bangnari enn dreingirnir. Mynd 23.

Tað tykist heldur ikki at vera stórvegis munur ímillum at vera bangin fyri happing í mun til aldur ella flokkar. Mynd 24. Støðan er sera javnt býtt, hon vísir, at tað eru umleið 50% í øllum flokkum, ið ikki eru bangin fyri at vera happað, meðan hin helvtin hevur meira og minni ótta fyri hesum.

### At kenna onkran, sum verður happaður

Vit settu næmingunum spurningin: kennir tú nakran, sum verður happaður í skúlanum? Orsøk–in til, at hesin spurningur kom við, var, at hann kundi indikera, hvussu nógv kendu floksfelagar o.o., ið vóru fyri happing, og tískil óbeinleiðis vóru ávirkað av happing.

Happing er ikki eitt isolerað fyribrigdi knýtt at tí einstaka næminginum. Hetta vísa serliga tær útskriftir, ið eru gjørdar av tí, sum næmingarnir greiða frá. Hesar útsagnir vísa greitt, at happing ávirkar nógv fleiri enn tey, sum eru beinleiðis útsett fyri tí, og stuðlar undir støðuna, ið Mynd 25. vísir.

Samanborðið við tey uml. 50% í hvørjum flokki, sum bera ótta fyri at vera fyri happing, passa hesi væl saman við teimum tølum, ið vísa tey, ið kenna onkran, sum verður happaður, ið eisini liggur uml. 50%. Vit hava tó ikki hugt, um talan er um tey somu, ið úttala seg her, og kunnu tí ikki vita hetta við vissu.

**Ert tú nakrantíð bangin fyri, at aðrir næmingar ikki dáma teg og halda teg uttanfyri? - í mun til kyn (%)**

| | Ongantíð | Sjáldan | Viðhvørt | Eitt sindur ofta | Ofta | Sera ofta |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Genta | 28 | 25 | 25 | 10 | 8 | 5 |
| Drongur | 53 | 26 | 15 | 3 | 2 | 1 |
| N=1819 | | | | | | |

**Mynd 26.**

**Ert tú nakrantíð bangin fyri, at aðrir næmingar ikki dáma teg og halda teg uttanfyri?**

| | Ongantíð | Sjáldan | Viðhvørt | Eitt sindur ofta | Ofta | Sera ofta |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. flokkur | 43 | 24 | 17 | 7 | 6 | 3 |
| 7. flokkur | 40 | 26 | 22 | 5 | 5 | 2,1 |
| 9. flokkur | 37 | 28 | 20 | 8 | 4 | 3,6 |
| N=1818 | | | | | | |

**Mynd 27**.

### At óttast fyri at vera hildin uttanfyri

Í sama mun, sum næmingar eru bangnir fyri happing, eru fleiri eisini bangin fyri at vera hildin uttanfyri, ikki at sleppa uppí, ella ikki at vera dámd. Tølini eru høg serliga fyri genturnar.

Vit hyggja fyrst at hesum spurningi í mun til kyn og síðani í mun til flokk.Mynd 26. Og svarini eru áhugaverd, tí tey vísa m.a., at heili 48% av gentunum ella 430 gentur bera henda ótta fyri at vera settar uttanfyri, og bert 28% eru ongantíð bangnar fyri hesum.

Hjá dreingjunum síggja tølini eitt sindur øðrvísi út, har eru tað 21% ella 193 dreingir, ið siga, at teir eru bangnir fyri at vera hildnir uttan-fyri, og 53% í mun til 28% hjá gentunum eru ongantíð bangnir fyri hesum. Hyggja vit hinvegin at spurninginum í mun til flokkar, síggja vit eitt sera javnt býti millum floksstigini. Hetta tykist tí at vera ein trupulleiki knýttur at kyni heldur enn aldri.

Hóast tølini í sambandi við floksbýti eru jøvn, kunnu tey eisini sigast at vera rímiliga høg.Mynd 27. Tí fleiri enn 60% óttast í onkran mun fyri at vera sett uttanfyri bólkin. At talið er so høgt fyri 9. flokk, kann møguliga yvirførast til kanningar í okkara grannalondum, sum vísa, at tað eisini eru trupulleikar við happing í miðnámsskúlanum. Har verður tað ikki tosað hart um happing, kanska orsakað av ótta og skommini at vísa, at ein verður happaður. Og har verður orðið drama brúkt sum felagsnevnari fyri fyribrigdið happing. Tað kann væl hugsast, við støði í tølunum fyri 9. flokk, at vit møguliga hava somu trupulleikar her hjá okk-um, og at happing verður flutt úr fólkaskúlanum inn í miðnámsskúlan, men ongar slíkar kanningar eru gjørdar í Føroyum, og tí er hetta bert gitingar.

*”Ein drongur læsti eina gentu í flokkinum inn í eitt skáp. Hon flutti flokk”.*

*”Ein genta togaði buksurnar hjá einari aðrari gentu niður framman fyri øllum flokkinum”.*

*"Ein drongur, bleiv happaður í fríkorterinum av floksfeløgunum. Teir kallaðu hann alt møguligt og skumpaðu hann, teir hóttu hann, um ikki at siga nakað".*

*"Eg havi verið við til at happa nemingar við mátanum at venja uppá".*

*"Eg bleiv kallað feit og ljót, og onkuntíð steinaðu tey eftir mær".*

*Tað vóru tveir dreingir, ið ofta skumpaðu ein annan, og so kom eg uppí og hjálpti til, tíverri".*

*"Ein drongur happar meg við at siga, at eg sleppi ikki í himmalin, tí eg eri ikki doypt-ur".*

*"Eg sigi tað ikki, at eg eri happaður, tí tað er ikki so alvorligt, eg verið happaður, men bara ikki so nógv. Tey arga meg við útsjóndini, og lúgva um meg, og hetta hava tey gjørt síðani 2. flokk, og tað blívur við".*




**Mynd 28.** *(Her kundu næmingarnir seta fleiri krossar)* N=1995




**Mynd 29.** *(% av teimum, sum svaraðu hesum spurningi, tey kundu seta fleiri krossar)* N=916

### 3.3 Hvussu fer happingin fram

Tann, sum er fyri happing, veit, hvat tað merkir at vera happaður. Sum vit hava ávíst í 2. parti, kann talan vera um kropsliga ella sálarliga happing, um at vera hildin uttanfyri felagsskapin. Happing kann vera áhaldandi og vara í fleiri ár, ella fevna um eitt avmarkað tíðarskeið. Happing kann vera andlit til andlits, ella við fartelefon, interneti, snapchat v.m., og hon kann fara fram opið og sjónliga ella óbeinleiðis og krógvað. Tað eru rættiliga nógv, sum siga og leggja dent á, at tey gera tað *"bara fyri stuttleika"*. Hetta sigur okkum, at happing er eitt sera samansett fyribrigdi.

Happing letur tann, sum er fyri happingini, í eina støðu, ið kann vera trupul at lýsa. Kenslur eru subjektivar og individuellar eins og orðatakið sigur "eingin kennir mein í annan mans bein". Av tí sama kann happing vera trupul at skilja, tí ein hending, ið onnur ikki halda at hava nakran týdning, kann kennast ógvuliga særandi fyri tann, sum upplivir hana. Á sama hátt kann ein hending, ið fleiri eru við í, vera særandi fyri ein, meðan hini ikki kenna tað á sama hátt. Í nágreiningini av happing verður víst á, at tað í flestu førum verður lagdur dentur á, at happing merkir endurtøka av hending ella hendingum. Men hetta merk-

ir ikki, at ein einstøk hending eisini kann vera ógvuslig og særandi. Ein næmingur kann kenna seg særdan og ólukkuligan í langa tíð eftir eina slíka hending, og tá er talan um happing.

Tey, sum hava svarað hesum spurningum, hava fingið at vita, at tað finnast nógvir hættir at happa, og tað, sum er nevnt her, eru dømi. Tey hava eisini fingið at vita, at tey skulu svara soleiðis, sum tey uppliva tað sjálv. Hava tey verið fyri øðrum enn tí í beinleiðis settu spurningunum, eru tey vælkomin at skriva hvat og kunnu umframt tað, aftast í spurnablaðnum, stutt greiða frá hending um happing, sum tey sjálv hava verið fyri.

## Kropslig og sálarlig happing

Í Mynd 28. (Næmingarnir høvdu høvi at seta fleiri krossar) síggja vit, hvussu tað verður happað. Her síggja vit, hvat tey, sum vera happað, eru útsett fyri. Vit síggja fyrst og fremst, at tann happing, sum fer fram og verdur framd, ið flestu førum er av sálarligum slag. Hetta er galdandi fyri bæði tey, sum vera happað, og tey sum happa. Vit síggja í tølunum, at tey flestu uppliva, at tað verður logið og slatrað, flent og sagt ymiskt særandi, umframt at tey vera hildin uttanfyri, ella sleppa ikki uppí. Býtið er nærum tað sama fyri tey, sum siga, at tey happa.

Hvat viðvíkur kropsligari happing, siga 3%, at tey ofta uppliva at vera sparkað og sligin. Tað sama talið, 3%, síggja vit hjá teimum, sum siga, at tey happa.

## Happing í sosialu miðlunum

Tá tað snýr seg um happing í sosialu miðlunum, sum eisini sæst í mynd 28. er um 2%, sum ofta uppliva, at aðrir næmingar hava sent teimum særandi boð ella myndir á fartelefonini ella internetinum (facebook, snapchat o.a.), og 9% hava upplivað hetta viðhvørt. Til samans er talan um 164 næmingar. Hóast hesi tølini ikki tykjast høg, er hetta ov nógv. Í okkara grannalondum vísir gransking á hesum øki, at happing í sosialu miðlunum er í skjótum vøkstri og veksur sam–svarandi menning av nýggjum forritum og møguleikum, bæði á teldu og í fartelefonini.

SSP[1], ið er eitt tvørfakligt samstarv millum skúla, foreldur og myndugleikar, hevur sum upp–gávu at læra um og at fyribyrgja happing í sosialu miðlunum. Tað kann hugsast, at tað er hetta arbeiðið, ið hevur virkað til, at talið á teimum, sum eru fyri happing í sosialu miðlunum, tykist lægri í Føroyum enn okkara grannalondum.

*1: SSP er eitt tvørfakligt samstarv millum Skúlaverk, Sosialar myndugleikar og Politi. Hetta eru stovnar og myndugleikar, sum hvør í sínum lagi hava serliga ábyrgd fyri trivnaði og uppvøkstri hjá børnum og ungum.*




**Mynd 30.** N=1995




**Mynd 31.** N=386

## At happa vegna útsjónd, húðarlit o.a.

Happing fer fram, sum áður nevnt, á nógvan ymiskan hátt. Og tað at happa vegna útsjónd, húðarlit, trúgv o.a., er nógv brúkt. Mynd 29.. (Her kundu tey seta fleiri krossar)

Tølini vísa okkum, at mesta happing innan hetta økið er orsaka av útsjónd, nakað næst eftir hetta er vegna klæði. Men øll hini økini eru eisini javnt umboðað. Hyggja vit at talvuni, sum lýsir hetta í mun til kyn, Mynd 30., síggja vit í fyrsta umfari, at tað mest eru dreingir, sum happa vegna útsjónd, og tað mest eru gentir, sum happa vegna klæði. Tey, sum seta kross við annað, skriva nógv ymiskt, sum t.d. familja, tenn, pirrur, samkyndleiki í familjuni, persónligheit, rødd, hevnd og orsaka av ongum, skriva fleiri.

Hyggja vit at somu talvum, men úr sjónar-horninum hjá teimum, sum happa, Mynd 31., sær myndin eitt sindur øðrvísi út. Her eru tað nevnliga flest dreingir, sum siga, at teir happa vegna húðar-




**Mynd 32.** N=1835




**Mynd 33.** N=1186




**Mynd 34.** N=1186




**Mynd 35.** N=1054

lit, útsjónd, trúgv, klæði og ítriv. Her hava genturnar ein minni leiklut, har tær framvegis halda seg til klæði og annað. Tað skal sigast, at talvan byggir á 386 svar. Tey, sum skriva annað, hava m.a. skrivað: eg happi hann orsakað av hansara undarliga flenni, tí hon dugur so væl í skúlanum, spæliteldu, kroppi, feit, o.s.fr.

### Hvussu verður happað í mun til kyn

Tá umræður kyn, eiga genturnar munandi størri part enn dreingirnir í bólkunum at lúgva og slatra. Tað eru 11% av gentunum, ið gera hetta í mun til 5% av dreingjunum. Tá tað snýr seg um at flenna at og brúka særandi orð, eiga genturnar 10% í mun til dreingirnar, sum eiga 5% av hesum, og til seinast eru tað 10% av gentunum, í mun til 4% av dreingjunum, sum ofta halda onnur uttanfyri og ikki lova uppí.

Samanbera vit hetta við spurningin omanfyri, so hava flest dreingir sagt, at teir happa vegna útsjónd, húðarlit, ítriv o.l., so tað kann vera, at tað er har, teir eiga munin.

Á síðu 25 er ein talva, sum vísir, hvussu happað verður í mun til flokkar. Her síggja vit m.a., at 9. flokkarnir hava yvirvágina í øllum bólkum, men serliga tá tað kemur til at lúgva og slatra um onnur. Tá tað kemur til at halda næmingar uttanfyri og at siga særandi ting, eiga 9. flokkarnir 17% í mun til 12% í 7. flokkunum og 13% í 5. flokkunum. Viðvíkjandi happing í sosialu miðlunum er tað eisini 9. flokkur, sum eigur munin við 2,9% í mun til 1,4% í 7. flokkunum og 1% í 5. flokkunum.

## 3.4 Hvar verður happað

Kanningin vísir heilt greitt, at mesta happingin fer fram í fríkorterinum Mynd 32.. Men hon vísir eisini, at happing fer fram í ávísan mun eisini í flokshølinum, uttanfyri skúlan og aðrastaðni í skúlanum. Hetta er júst sama úrslit, sum kanningin í 2007 kom til. Tey, sum skriva annað, nevna í fleiri førum vesini, vøllin o.l. Niðanfyri hava vit hugt at spurninginum um, hvar tað verður happað í mun til kyn, Mynd 33.. Her síggja vit, at gentur og dreingir eru sera eins, tá tað kemur til fríkorterið og aðrastaðni í skúlanum, men síðani broytist myndin, og tað verða genturnar, sum sjónliga eiga munin í flokshølinum og serliga í sosialu miðlunum.

Í mun til flokkar og hvar tað verður happað, vísir Mynd 34. greitt, at happing í sosialu miðlunum er størst í 9. flokkunum. Í 7. flokki er javnt býti millum, hvar tað verður happað. Men í 5. flokki fer happingin fram á snapchat og aðrastaðni,

| JA, havi sagt frá, at eg eri vorðin happað/ur (%) | | |
|---|---|---|
| | | Tal |
| Við flokslæraran | 9% | 178 |
| Við heilsufrøðingin | 5% | 98 |
| Við annan vaksnan í skúlanum | 3% | 52 |
| Við onkran vaksnan heima | 15% | 304 |
| Við tann ella tey sum happaðu meg | 5% | 90 |
| Við onkran annan | 6% | 118 |
| N=840 | | |

**Mynd 36.**

| NEI, havi IKKI sagt frá at eg eri vorðin happað/ur | | |
|---|---|---|
| | % | Tal |
| Hevði ongan at siga tað við | 2% | 40 |
| Visti ikki, hvønn eg skuldi siga tað viðl | 2% | 34 |
| Var bangin | 2% | 39 |
| Lærarin ger einki allíkavæl | 4% | 71 |
| Kláraði tað sjálv/ur | 7% | 133 |
| Annað | 3% | 61 |
| N=378 | | |

**Mynd 37.**




**Mynd 38**

| Hevur tú fingið hjálp í skúlanum, tá tú ert vorðin happað/ur? (%) | | |
|---|---|---|
| | | Tal |
| Nei | 13 | 256 |
| Ja, eina ferð | 8 | 167 |
| Ja, fleiri ferðir | 9 | 172 |
| Ja, men tað byrjaði aftur | 3 | 49 |
| Er er ikki blivin happað/ur | 54 | 1086 |
| N=1730 av 1995 | | |

**Mynd 39a.**

ið næmingarnir sjálvir hava viðmerkt. Eitt nú hava fleiri nevnt ítøkilig støð í skúlanum.
Til seinast hava vit hugt nærri at stødd á skúlum. Mynd 35.,vísir, at tað er ikki stórvegis munur á, hvar happingin fer fram, um skúlin er stórur ella lítil.
Munurin er, at teir minstu skúlarnir hava meira happing í sosialu miðlunum enn í miðalstóru skúlunum. Teir stóru skúlarnir hava mest happing í flokshølinum, uttanfyri skúlan og í fríkorterinum.

## 3.5 Fráboðan um happing

Happing er eitt evni, ið verður umrøtt í skúlunum. Teir flestu skúlar hava eisini átøk, ið skulu minka um happing. Í hesum parti hyggja vit nærri at, hvussu støðan er við m.a. fráboðan um happing, um næmingar siga frá, hvønn tosa teir so við, og um nei, hví siga teir ikki frá. Síðani settu við spurningin, hvat tey meta, at skúlin ger við happing.

Vit síggja í Mynd 36., at teir næmingar, sum siga frá happing, fyrst og fremst siga tað við onkran vaksnan heima ella onkran annan tey kenna. Næst er tað við flokslæraran, heilsufrøðingin og tann, sum happar.




**Mynd 40.** N=1995

| Hevur tú fingið hjálp í skúlanum, tá tú hevur verið við til at happa? | | |
|---|---|---|
| | % | Tal |
| Nei | 27 | 529 |
| Ja, eina ferð | 7 | 137 |
| Ja, fleiri ferðir | 4 | 82 |
| Havi ikki happa | 48 | 966 |
| N=1714 av 1995 | | |

**Mynd 39b.**

Tað eru fleiri av teimum, sum verða happað, ið ikki siga tað við nakran. Mynd 37.. Nøkur meta, at hetta klára tey sjálv, og onnur tora ikki ella hava ongan at siga tað við. Nøkur siga tað ikki við læraran, tí sum tey siga, "hann ger einki við tað allíkavæl". Hesin seinasti svarmøguleikin kom inn í spurnablaðið eftir forkanningina, tí nakrir næmingar nevndu, at hetta var ein støða, sum ikki var so óvanlig.

Hetta at tey, sum eru fyri happing, ikki siga frá, er ikki óvanligt, tí m.a. gransking í eitt nú eXbus, kemur til sama úrslit.

### Atferð í mun til happing

Sum kanningin higartil hevur víst, so eru tað nógvir næmingar í fólkaskúlanum, sum á onkran hátt koma í námind av happing. Í spurnablaðnum spyrja vit næmingin, hvat hann ger, tá onnur blíva happað? Svarini vit fingu, eru hesi vit síggja í Mynd 38.

Teir flestu næmingarnir velja at siga læraranum frá, meðan eins nógvir leggja ikki merki til happing. Mong vita ikki, hvat tey skulu gera, og næstan líka nógv siga, at tey ikki blanda seg uppí.

### At fáa hjálp

Hesin spurningur er svaraður av 1730 næmingum, Mynd 39. Her síggja vit, at uml. 54% ikki hava verið fyri happing, og tað passar væl til onnur líknandi tøl í kanningini. Av teimum, sum hava verið fyri happing, siga 256 t.v.s. 12%, at tey ikki hava fingið nakra hjálp, hetta kann samanberast við spurningin um at boða frá, har 378 næmingar siga, at teir ikki hava sagt frá, at teir eru fyri happing. Talið á teimum, sum hava fingið hjálp eina ella fleiri ferðir, er 339. Nakrir næmingar hava fingið hjálp, men happingin byrjaði aftur, og so eru tað 265 næmingar ella 13,3%, sum ikki hava svarað hesum spurningi.

### Hvat ger skúlin við happing?

Tað, sum næmingarnir siga um henda spurning, er í høvuðsheitinum, at tað verða gjørd tiltøk í skúlunum til tess at fyribyrgja happing. Tað er í flestu førum talan um at tosa um happing og við teir útvaldu partar, sum eru uppi í happing.

Sum Mynd 40. vísir, so eru tey flestu ella 43% samd um, at lærarin tosar við flokkin um happing. 21% halda, at tað hjálpir nógv, og 10% halda, at tað ikki hjálpir. Tað eru 263 næmingar, ið ikki meta, at tað verður gjørt nakað fyri at steðga happing.

| Happing samlað í 2007 | |
|---|---|
| Eru ikki happað | 85% |
| Eru happað | 15% |
| **Tilsamans** | **100%** |
| Hava ikki happað | 87% |
| Hava happað | 13% |
| **Tilsamans** | **100%** |

**Mynd 41.** N=1054

| Happing og kyn 2007 - eru happað | | |
|---|---|---|
| | Genta | Drongur |
| Ikki happað | 87% | 82% |
| Eri happað | 13% | 18% |
| | | |
| Happing og kyn 2007 - tey sum happað | | |
| | Genta | Drongur |
| Ikki happað | 92% | 83% |
| Hava happað | 8% | 17% |

**Mynd 42.** N=1054

*"Ein drongur í flokkinum gekk leingi og segði, at ein genta í flokkinum var ljót og feit. Eg royndi onkuntíð at steðga tí, men drongurin vendi sær í móti mær og happaði meg. Eg segði frá heima, og mamma fór til læraran og mammu gentuna. Eg føldi ikki at lærararnir gjørdu serliga nógv við tað".*

### Samanbering við kanningina í 2007

Kanningin í 2007 vísti, at 15% av teimum spurdu søgdu seg at vera fyri happing, meðan 13% vóru við til at happa. Mynd 41. Tá var mett, at umleið 76% vóru uttanfyri happing. Tá vísti kanningin eisini, at happing í høvuðsheitinum fór fram í skúlagarðinum, í fríkorterinum, í gongini og í flokshølinum, bæði meðan tað var undirvíst, og tá eingin var har. Teir mest nýttu hættirnir at happa vóru at flenna, kalla, slatra, lúgva. Tann fysiska happingin at sparka og sláa lá um 7%.

Í mun til kyn vóru tað fleiri dreingir 18%, ið vóru fyri happing og umleið 17%, sum luttóku í happing. Tølini hjá gentunum vóru ávikavist 13% og 8%. Mynd 42. Í mun til aldur vóru tað 5. flokkarnir, ið vóru mest útsettir fyri happing, men tann aldursbólkur, ið happaði mest, var 7. flokkur. Annars var tað sera javnt býtt.

Í 2007 vísti kanningin, at tey, sum vóru fyri happing, ikki trívast væl og sama tey, sum vóru við til at happa. Talið var 45% fyri báðar bólkar. Í sambandi við at leggja happing til merkis, vóru tað 54% í 2007, sum søgdu, at tey ikki høvdu lagt til merkis, at nakar var happaður.

**Støðan í dag samanborin við 2007**

Síðani 2007 er útbreiðslan av happing fallin við 2%. Meðan útbreiðslan millum tey, sum hava verið við til at happa, er vaksin við 20%. Í aðrar mátar kann sigast, at myndin er sera eins frá 2007 til 2015. Hesi 7 árini, sum eru liðin, er samlaða talið av teimum, sum eru uttan fyri happing, lækkað, úr 76% til 71%. Tað merkir, at tað eru fleiri, sum eru partur í happing nú í mun til 2007. Hetta kemur av, at tað eru fleiri, sum eru við til at happa, also happa saman við øðrum. Ein svarmøguleiki, sum ikki var í 2007. Mynstrið, sum vísir, hvar tað verður happað og hvussu, er tað sama, og munurin millum kynini er tann sami. Tað er tó ein munur í aldursbólkunum, tí í dag vísir tað seg at vera 9. flokkarnir, sum happa mest, meðan tað í 2007 vóru 7. flokkarnir. Eitt annað, ið kann samanberast, er, at í 2007 søgdu 53%, at tey ikki løgdu til merkis, at nakar var happaður. Í 2015 vóru tað 29%, sum søgdu hetta.

Vit hava valt ikki at fara meira í dýpdina við samanberingum millum kanningina í 2007 og 2015, tí sum tað er nevnt frammanundan, so eru spurningarnir í fleiri førum øðrvísi enn í 2007. Vit góvu næmingunum fleiri valmøguleikar, eitt nú at svara fyrr men ikki longur, og at siga, at tey vóru við til at happa, men bara saman við øðrum. Hetta hevur uttan iva ført við sær, at fleiri fáa svarað í tráð við nýggju fatanina av happing.

Samanlagt kunna vit siga, at nógv er óbroytt innan happing síðani 2007. Nøkur viðurskifti eru torfør at samanbera, tó so henda kanningin bendir á, at færri eru útsett fyri happing í dag enn í 2007, og tað er eitt avgerandi framstig.

# 3. Partur

## Kjak og faklig viðgerð

Við teimum møguleikum, ið spurnablaðið gevur okkum at kortleggja happing í einum breiðum høpi, fara vit í hesum parti at velja nøkur evni út og greina tey nærri.

*"Eg haldi, at tit skulu finna útav, hvussu tað byrjar."*

Úrslitini í spurnakanningini vísa, hvussu torgreiddur og samansettur trupulleikin við happing er, bæði fyri skúlaverkið og tey, sum eru partur í happing. Skulu vit skilja mekanismurnar og gongdirnar í sosiala maskinarínum, sum happing er ein partur av, mugu vit vera forvitin og hyggja handan atferðina í happing. Øll atferð er lærd og gevur meining í løtuni fyri næmingin.

Kanningin vísir, at 13% av næmingunum í fólkaskúlanum eru útsett fyri beinleiðis happing og harumframt, at fleiri enn hesi eru óbeinleiðis rakt av happing.

Happing rakar breitt og røkkur væl longri enn til tann einstaka. Hon rakar m.a.:

- tann, sum verður útsettur fyri happing
- tann, sum happar
- undirvísingina
- sosialu samveruna í flokkinum
- tey, sum eru vitni til happing
- heimið og familjuna
- framtíðina hjá børnum og ungum
- samfelagið

**Óttin fyri útihýsing**

Eitt umhvørvi, har happing trívist, er eitt umhvørvi, ið útihýsir og innlimar hvørt um annað. Eitt slíkt umhvørvi elvur til ótta í felagsskapinum, ótta fyri ikki at sleppa uppí. Framleiðslan av tign fær ring kor og framleiðsla av andstygd verður ráðandi. Hetta mynstrið er sjónligt í hesi kanning og vísir eina mynd av børnum og ungum, ið hava tað trupult í gerandisdegnum.

Teir nógvu tímarnir, næmingar eru í skúla, eru við til at mynda menning og læring. At vera hildin uttanfyri og tillátursgjørdur í hesum gerandisumhvørvinum ávirkar lívsgóðskuna, relatiónirnar og møguleikan at læra, mennast og gerast fultvirkið menniskja.

Fyri at kunna broyta støðuna, tørvar okkum hesa kortlegging av happing, men okkum tørvar eisini aðra vitan, ítøkilig ráð og amboð at virka eftir. Vit fara í tekstinum niðanfyri at royna at koma nærri nøkrum av hesum, m.a. við at kaga í granskingarúrslit hjá tí tvørfakliga toyminum handan eXbus og knýta nøkur av okkara úrslitum afturat.

**Happing er ikki altíð sjónlig og ítøkilig**

Trupulleikin við happing er størri, enn hann sær út, og er meira og annað enn tað, sum eygað sær. Í lærarakanningini, sum er lýst í 5. parti, eru tað lærarar, sum siga, at "sjálvandi fer happing fram, men eg síggi einki til happing". Hetta sama síggja vit í svarunum, sum næmingar geva í spurninginum um, hvat tey gera, tá happing fer fram. Har svara 29%, at tey ikki hava lagt merki til, at nakar verður happaður. Eitt annað fyribrigdi er, at næm–ingar úr sama flokki greiða frá ítøkiligum hend–ingum um happing í flokkinum, meðan aðrir siga, "tað er eingin happing í okkara flokki" .

Dømini omanfyri kunnu geva onkrum tankan, at hetta snýr seg bara um næmingar, sum eru erkvisnir, og tí bara siga, at happing fer fram. Her kann eisini vera talan um bæði definitiónsmakt og –rætt, ynskistøðu, hugburð og ymiskleika í, hvussu vit uppliva í felagsskapi. Vitan er makt og harvið eisini avgerðir um, hvat happing er. Men talan er um eftirfarandi tøl, og at happing er so umfatandi sum sagt, síggja vit m.a. við at taka eitt tvørsnitt av fleiri úrslitum. Ein orsøk til høgu tølini liggur sannlíkt í háttinum, vit spyrja. Vit avmarka ikki møguleikan hjá næmingunum at seta kross við, hvørt tey eru ella hava verið fyri happing. Spurnablaðið gevur harumframt svarmøguleikarnar "fyrr, men ikki longur" og "bara saman við øðrum". Hesir møguleikar vóru ikki við í kanningini frá 2007. Síðstnevnda møguleika valdu vit at hava í spurnablaðnum m.a. út frá vitanini um, at ábyrgdarkenslan vatnar út, tá fleiri eru saman um eina negativa gerð. Soleiðis kann t.d. leikluturin í happing, tá hann "bara er saman við øðrum", vera lættari at viðurkenna.

Lagkøkan ella Mynd 3. vísir, at 47% av teim–um luttakandi 1995 næmingunum í kanningini ikki hava verið fyri happing. Tá vit taka tey burtur

av, ið hava svarað ”fyrr, men ikki longur”, er talið tó 71%. Í spurningunum um m.a. ótta fyri happing, at kenna onkran sum verður happaður o.s.fr., eru tað um 50%, ið siga ja.

Happing er livandi og flytur seg. Gransking hjá eXbus vísir, at næmingar kunnu uppliva tíðarskeið, har happingin krøkir seg fasta, men so sleppir takinum aftur. Hon kemur og fer, og ongin kann vita seg tryggan. Hetta sigur okkum, at hóast nógv av happingini fer fram, óbeinleiðis og krógvað, so er hon til staðar. Tí er tað umráðandi m.a. at hava vitan um mekanismurnar í hesum, geva sjálvupplivilsunum hjá næmingum virði og at geva samskiftinum ans.

**Dreingir og gentur**

Tað eru dreingirnir, sum eru mest útsettir fyri happing, og tað eru dreingir, sum happa mest. Munurin er rímiliga stórur, tí 15% av dreingjunum vera happaðir ofta, ímóti 11% av gentunum. 24% av dreingjunum siga seg at happa, meðan tað er 12% av gentunum, sum siga tað. Annar kynsmunur sæst í mátanum at happa. Genturnar eiga munin við at slatra og baktala og at brúka sosialu miðlarnar, meðan dreingirnir halda seg til slíkt sum útsjónd, ítrótt o.l. og at krógva ting. Felags fyri kynini í mátanum at happa uppá er at útihýsa og flenna eftir næmingum. Annars er kynsbýtið javnt, bæði tá tað kemur til flokkar, stødd á skúla, trivnað og læring.

Tað finst eingin greið ábending um, hví dreingir eiga munin í happing. Tað eru røddir frammi um, at tað kann vera, tí dreingir ikki tíma skúlan eins væl og gentur, men hetta kann bara vera satt, um tað, at tíma skúlan og at trívast í skúlanum, ikki hanga saman. Ein onnur hugsan kann vera, at dreingir hava aðra tilgongd til at viðurkenna egnan leiklut í happing. Tí fleiri enn 80% av dreingjunum og gentunum siga, at tey trívast í skúlanum.

Men hesin spurningur um kynsbýtið í happing ger, at tað er neyðugt hjá skúlanum at hyggja nærri at støðuni hjá dreingjum í fólkaskúlanum.

**At trívast saman**

Tølini, sum vísa trivnað í skúlanum, vísa, at uml. 80 % av næmingunum trívast væl. Hetta er eisini galdandi fyri fleiri av teimum, sum happa. At vera partur í happing er jú at vera partur av felagsskapi, sum gevur *vit*-kenslu, also trivnað í løtuni. Tað eru tey, sum vera happað, ið ikki trívast. Hesi eru jú uttanfyri felagsskapin, hoyra til hini. Samstundis hava vit onnur tøl, ið kunnu knýtast at spurninginum um at trívast, og tað er m.a. um at óttast fyri happing og útihýsing. Her sær myndin øðrvísi út, tí heili 70% av gentunum siga, at tær eru bangnar fyri at vera útihýstar frá felagsskapinum ímóti 40% av dreingjunum, ið eisini er eitt høgt tal. Onnur tøl, eitt nú at óttast fyri happing, liggja eisini høgt.

Hetta sigur okkum, at tað vit vísa á í 2. parti í stóran mun speglar føroyska skúlan. Tí ótti, angist og mistrivnaður eru viðvirkandi kreftirnar í at framleiða andstygd, sum aftur leiðir til happing.

**At vera í skúla, og longsul at hoyra til**

Ein annar partur av somu søk er vinarlag í skúlanum. Her síggja vit eisini sama mynstur. Tey, sum trívast væl, hava fleiri vinir í flokkinum og øðrum flokkum, meðan tey, sum ikki trívast ella eru fyri happing, hava fáar ella ongar vinir. Hesi tølini kunnu tulkast sum ein ójavnvág í sambondunum millum næmingarnar í skúlafelagsskapinum og kann við støði í okkara tilgongd til evnið og paradigmu 2 greinast soleiðis:

***At vera í skúla (felags triði) og innivist í útihýsing (inkluderað eksklusión)***

Sum fleiri ferðir nevnt, er tað eksistentielt neyðugt fyri menniskjuna at hoyra til. Børn eru sett í skúlan og víst til at vera og trívast saman har. Fyri at tað skal geva meining, hava tey fyri neyðini eisini at hava nakað felags at trívast um, eitt felags triðja. Hetta felags triðja er bæði undirvísingin og lívið í flokkinum, relatiónirnar.

Tað er í skúlanum, at faklig læring fer fram, og tað er har, tey læra at vera vinir. Bæði við tey, sum teimum dámar, og sum teimum dámar minni væl. Tá hesi viðurskiftini undirvísing og relatiónir ikki sampakka, seyrar tað úr meiningini við at vera í skúla. Strembanin eftir meining flytur seg yvir í happifelagsskap. Happing gerst mátin at vera saman uppá, har inni- og útimynstur verða skapt. Hetta sæst aftur í kanningini, har m.a. útihýsing og onnur sálarlig happing er fremst.

Tá er flokkurin raktur av angist, og tað ræður um at sleppa at hoyra til, skapa og varðveita vinarløg og samstundis royna at halda útvald úti. Fyri at happing skal eydnast, skulu bæði eitt vit og eitt tit til. Fyri at vinna kensluna av sterkum felagsskapi, vit, krevst útihýsing av einum ella fleiri, tit, hini. Happing er sostatt tvíbýtt upp á fleiri mátar. Hon gevur meining hjá teimum, sum hoyra til, og hon er meiningsleys fyri tey, sum

eru sett uttanfyri. Hon er sosial fyri tey, sum eru innanfyri, og hon er asosial fyri tey, sum eru uttanfyri. Hesi síðstu eru tó partur av flokkinum á tann hátt, at tey eru told har, men fáa ikki ávirkan ella lut í felagsskapinum. Hetta er innivist í útihýsing.

*"Eg eri blivin happað, sligin, sparkað, spýtt á og kallað ljót nøvn. Tað er ikki líka ringt, sum tað var, men tað gongur fyri seg enn".*

Sostatt kunnu tey, sum happa, hava nógvar vinir sínámillum og trívast væl í flokkinum. Tey, sum verða happað, eru oftast í dýrastu neyð, einsamøll og royna at halda út. Empati og taka synd í er avmarkað til vit-bólkin, sonevnd selektiv empati.

**Læringin í vanda**

Kanningin vísir týðiliga, at trivnaður og læring ganga hond í hond. Í tølunum, sum vísa sambandið millum at trívast og at læra, síggja vit eitt týðiligt mynstur. Tey, sum trívast væl, siga seg duga væl ella sera væl. Hinvegin siga tey, sum vera happað, at tey ikki trívast, og at tey duga illa og sera illa.

Seta vit hetta inn í ein samanhang, ið lýsir tørvin hjá næminginum í skúlalívinum mynd 3., síggja vit, at tá skúlafelagsskapurin ikki gerst snúningsdepil, verða næmingarnir upptiknir av hvørjum øðrum. Ein hierarkisk skipan fer í gongd. Næmingarnir verða upptiknir av, hvør er populerur, hvørjum nýtist man ikki at rokna við, hvørjum skal man halda seg burtur frá, hvat skal til fyri at tryggja sær sæti, hvør og hvat hevur og gevur mæti. Rationel hugsan verður sett til viks, kenslur verða stýrandi fyri atferð, og gerðir og empati virka bara í mun til tað útvalda, til tey, sum eru innlimað í felagsskapin.

**At angra luttøku í happing**

Vit síggja m.a. í fleiri av frásøgnunum hjá næmingunum, at teir hava ringa samvitsku og angra, at teir hava verið við til at happa. Her er óivað talan um sonevnda parallelmoralin, sum er vorðin upploystur. Empati og umhugsni eru farin at virka aftur. Soleiðis vil tað vera, tá happingin er av, og óttin fyri útihýsing ikki er valdandi meira. Eisini er hetta prógv um, at happing er destruktiv fyri allar partar, men samstundis ein neyðugur partur, tá sosiali felagsskapurin er farin av kós. Tað er ringt fyri tey, sum happingin rakar, og sum tíðin líður, verða tey, sum hava happað, eisini rakt.

*" Eg havi happað, og eg eri blivin happað, og eg eri kedd av tí!"*

*"Tit mugu steðga happing! Tað er forferdiligt. Og tíverri er tað bara tey, sum sjálv hava verið úti fyri tí, sum vita, at happing er alt annað enn stuttligt. Eg angri alt, sum eg nakrantíð havi gjørt viðvíkjandi happing."*

**Avleiðingar av happing**

Tað skal ikki bagatelliserast upp á nakran máta, hvat happing ger við tey beinleiðis raktu. Avleiðingin kann skeikla samleikakensluna í grundvøllinum soleiðis, at tey verða fremmand fyri sær sjálvum, missa álitið á onnur eisini í øðrum felagsskapum, og harvið verður longsulin at hoyra til ein ævigur fylgisveinur. Einsemi og aðrir tvørleikar koma at gera sítt til, at sosialur felagsskapur verður ringur at vera partur av, og harvið gerst tilveran yvirhøvur trupul. Harafturat kann sosial útihýsing upplivast sum sera skommfull, ein kensla sum er nívandi og oyðileggjandi. Bara tað at vera í skúla kann "trigga" kensluna av ótta, hóast happingin er av. Álitið á umverðina viknar, og verðin kann kennast ótrygg.

*"Tá tey siga, at eg ikki dugi at sparka, eri ljótur, býttur og brekaður, so blívi eg so óður og svakur, at eg sparki stólar og borð, gráti mega lætt og rými heim og verði heima í tveir dagar, kanska tvær vikur. Og so, tá eg komi í skúla aftur, verði eg aftur happaður. Hatta var fyrr. Nú er gott, men eg gráti nokkso lætt."*

Hetta vísir, hvussu umráðandi tað er at hava eitt dygdargott læringsumhvørvi í fólkaskúla–num, ið tekur hædd fyri bæði formellu og óformellu gongdunum í felagsskapinum. Boðið hjá eXbusbólkinum her er sonevndi *felags–skapandi didaktikkur*, sum eigur at granskast og mennast (Hansen 2011).

**Skemt, at flenna og "Bara til stuttleika"**

Skemt er samskiftisamboð, sum er sosialt regulerandi í einum bólki. Tað kann vera gagnligt, savnandi og forloysandi, men tað kann eisini fara hinvegin, at tað verður tillátursgerandi og útihýsandi. Soleiðis kann skemt og látur vera umráðandi amboð í samráðingunum um, hvør er inni, og hvør er úti. Tey eru viðvirkandi í skapanini av normum og hierarkii, hvørjum tað kann flennast eftir, og hvør kann luttaka í látrinum. Á vegnum út úr felagsskapinum, kann látur, at flenna, verða brúkt fyri at signalera, at man er við. Tá innliman er tryggjað, kann tað at flenna verða

brúkt fyri at staðfesta og tryggja positiónina í felagsskapinum.

*”Tað er ikki serliga ofta, at vit happa. Tað er mest fyri stuttleika, og persónurin, sum verður happaður, flennir sum oftast.”*

Tað er afturvendandi partur í frásagnunum hjá næmingunum, at tað at verða flentur at, er kjarnan í ótespiligu upplivingini av happing. Tað er sum at vera settur skák mát.

*”Ein genta spyr ein lærara ein spurning. Lærarin svarar, at gentan spyr ov nógv og ger býttan sjónleik og øll flenna. Og eg síggi, at gentan er kedd, men smílist allíkavæl.”*

Heilt nógvir næmingar hava gjørt viðmerk–ingina ”Tað er bara fyri stuttleikar” inni í spurna-blaðnum, har tey hava sett kross við, hvussu happingin fer fram. Hetta ber boð um, at næmingar onkursvegna hava brúk fyri at bagatellisera happingina og ikki fáa tikið ábyrgd av henni. Skemt verður brúkt sum forkláring upp á t.d. hetta at taka ting ella kalla onkran. Tann, sum upplivir happing fær illa vart seg í hesum, tí hóast hann mutar ímóti, kann hann verða sagdur ikki at skilja ella tola skemt.

Skemt er sostatt ein liður í samskiftinum, sum skúlin og lærarin skal hava áhuga í og taka upp við næmingarnar bæði í ávísum støðum og yvir-høvur. Hvat er skemt? Hvat merkir tað at flenna?

**Hvar fer happing fram?**

Happing kann fara fram allastaðni, men hon tykist vera mest í flokshølinum og í fríkorterinum, ið má metast at vera í skúlagarðinum ella aðrastaðni í skúlaumhvørvinum. Tað eru mest næmingar í egnum flokki, sum happa, men tað er heldur ikki óvanligt, at tað eru næmingar í øðrum flokkum.

Í frásøgnum hjá næmingunum í spurna-blaðnum verða onnur støð at happa nevnd, eitt nú vesini, vøllurin o.l. Tað eru fleiri næmingar, ið siga frá hendingum, har tey vera koyrd inn í skáp ella læst inni.

Happing hevur tí ikki eitt eintýtt skap, men kann fara fram allastaðni og upp á nógvar mátar.

*“Onkur hevur kastað skógvar hjá einum lítlum drongi á eina lampu, sum hongur uppi undir loftinum. Eg eri heppin, at eg ikki verði happaður. Og EG HAPPI IKKI!!!”*

**Happimynstur**

Happing er eitt sosialt mynstur, sum er aktivt í einum givnum samanhangi. Tað er eitt vit-prob-lem, sum livir sítt lív í flokkinum. Nógvar meka-nismur eru upp á spæl, og hóast tann happaði fer úr flokkinum, stendur tann sosiala skipanin eftir, og hon hevur sín egna logikk. Happing er sostatt ikki grundað í einstaklinginum, men happing rakar einstaklingin.

Áhaldandi ótrygt veðurlag í flokkinum gevur atferð, sum verður eitt mynstur í mátanum at vera saman uppá. Mynstrið kann broytast, men kann eisini gerast so fastlæst, at tað illa slepst burtur úr tí aftur. Hetta er slítandi fyri bæði tey, sum happa og tey, sum verða happað. Fyri tey, sum happa, gevur tað nívandi samvitskubit, tá tey eru komin úr mynstrinum og aftur fáa hugsað klárt, og empatiið er fult virkandi aftur. Fyri tey, sum verða happað, er tað stríggið áhaldandi at royna at verða partur av felagsskapinum, sum tey antin eru told av ella útihýst av. Tíðum kunnu tey velja at líða í felagsskapinum heldur enn at vera uttanfyri, men støðan kann verða so varandi, at tey uppgeva at hoyra til.

*”Vil bara byrja av nýggjum í einum øðrum skúla. Tími ikki at vera hildin uttanfyri meira, orki ikki at royna at sleppa innaftur.”*

**Happing í sosialu miðlunum**

Tølini í kanningini vísa, at 12% (214 næmingar) hava upplivað at vera fyri happing í sosialu miðlunum. At vera eyðmýktur framman fyri egn-um floksfelagum er ringt, men at vera eyðmýktur og vístur fram fyri einari óendaligar mongd av fólki er ræðuligt. Jette Kofoed, fra Aarhus Universitet, hevur seinnu árini arbeitt nógv við happing í sosialu miðlunum. Ikki at vita hvar tað fer, sum verður sagt ella víst, gevur eina óendaliga kenslu av avmegd, viðmerkir hon (Kofoed & Søndergaard 2009).

*”Eg haldi, at happing gjøgnum netið er eitt av tí ringasta, sum er akkurát nú, tí man kann ikki gera nakað við tað.”*

Vit hava viðgjørt happimynstur í sambandi við happing í skúlanum, men tá tað snýr seg um sosialu miðlarnar, verður mynstrið broytt alla tíðina.

Í sambandi við sosialu miðlarnar síggja vit, at tað serliga eru gentur, ið eru fyri happing her. Somuleiðis síggja vit, at næmingar í smáum

skúlum, meira enn í størri skúlum, líða undir hesum. Hetta er ítøkiligur kunnleiki, ið ítøkilig átøk kunnu rættast ímóti.

Appir og forrit verða alsamt ment, sum børn royna seg við. Tá kanningin fór í gongd, vóru mong, sum vildu vera við, at happingin á internetinum er størri, enn hesi tølini vísa. Tað kann hugsast, at SSP-tiltakið virkar og eigur sín lut í at halda tølunum niðri. Men 214 næmingar er tó nógv, so tað er framhaldandi týdningarmikið, at fyribyrging áhaldandi hevur høga raðfesting.

**At siga frá**

Tað eru fleiri, sum eru fyri happing, ið ikki siga tað við nakran. Tey halda tað fyri seg sjálvan. Heili 378 næmingar, sum eru fyri happing, siga ikki frá. Orsøkirnar hjá næmingunum eru m.a., at teir ikki vita, hvønn teir skulu tosa við, eru bangnir ella ikki vilja siga tað, tí tey klára tað sjálv.

At skilja, hví so nógv ikki siga frá, krevur, at vit hyggja eftir tørvinum fyri sosialari innliman og samleikakensluni. Vansarnir við at siga frá eru nógvir, m.a. fyri at verða enn meira útihýstur, og annar vansi er hetta at fáa tillutað leiklutin sum offur og veikur. At viðurkenna fyri sær sjálvum at vera fyri útihýsing ella andstygd kann vera trupult í sær sjálvum, og tískil kann tað tykjast uppaftur meira sárt at viðurkenna tað yvir fyri øðrum.

*“Eg eri bangin fyri at snakka við flokkin um tað.”*

Um tað er so, at paradigma 1., er valdandi í skúlanum og samfelagnum sum heild, kann tað vera trupult at identifisera seg við happing. Hetta fyri tann, sum happar, og tann, sum verður happaður. Tað eru ikki serliga rósandi eginleikar, sum liggja í heitunum t.d. happari og offur, og er heitið einaferð tengt at einum næmingi, kann tað verða ilt at sleppa av aftur við. Hóast heitini ikki verða nevnd, kann mátin, skúlin og tey vaksnu fara um næmingarnar, skína ígjøgnum, so at næmingarnir uppliva seg sum verandi í einum ávísum leikluti, sum kann vera fastlæsandi og ikki uppbyggjandi.

*”Ongin sigur nakað, tí ongin vil vera slatritaskan.”*

*”Eg bleiv altíð kallað ljót orð, men eg spældi, sum um eg ikki legði nakað í tað, men tað gørdi eg, og tað var frá 2. til 4. flokk. Eg havi eisini sæð onnur blivið happað, og eg havi forsvarað tey, men onkuntíð var eg bangin fyri, at tey fóru at kalla meg ting, so eg segði onki.”*

Hóast happingin er av, kann upplivilsið sita eftir í kroppinum. Sjálvskenslan og samleikin kunnu verða skeiklað av áhaldandi happing. Við tíðini kann tað verða internaliserað, sum hevur verið sagt við og um næmingin.

*”Tey siga ting við meg, sum eg ikki kann gera við, at eg eri lítil og havi stóra nøs. Eisini, at eg dugi ikki at sparka fótbólt, og at eg ongar vinir havi. Og tað ringa er eisini, at eg eri so følsom og veik. Eg taki alt so nær.”*

Øll skulu kunna siga frá, og rúmd skal gevast næmingum at vera ekspertar og aktørar í egnum lívi. Skúlin má umhugsa møguleikar í hesum sambandi. Hesir møguleikar skulu hava fyri–brigdini framleiðsla av tign og framleiðsla av andstygd í huga og formella og óformella skúlan. Móttøka av fráboðan, samskifti við næmingarnar og tiltøk í tí sambandinum kunnu vera avgerandi fyri, um happingin steðgar. Er lærarin t.d. illur við drongin, sum kallar, og serliga blíður við gentuna, sum er kedd, er vandi fyri, at happingin heldur fram.

**Happing sum orð og fyribrigdi**

Okkurt bendir á, at orðið ”happing” er troyttandi fyri næmingar. ”Vit tíma ikki at hoyra meira um happing” siga bæði lærarar frá næmingum og næmingar sjálvir. Og tað verður nógv snakkað um happing í skúlanum. Í tølunum, ið vísa, hvat verður gjørt fyri at basa happing, eru tey flestu samd um, at tað verður tosað um tað.

*”Man kundi gjørt meira við at steðga happing og ikki bara tosa um tað.”*

Tað kann hugsast, at afturvendandi tosið um happing er merkt av definitiónsmaktini hjá teimum vaksnu og gevur fastlæsandi meiningar um eitt fyribrigdi, sum næmingarnir hava annað innlit í og hóming av at vera nógv meira komplekst, enn tað verður handfarið sum og tosað um.

Næmingar ynskja gerðir fram um talu um happing. Teir eru í happingini, og teir ynskja gerð, sum fær teir úr henni. Gerð frá teimum, sum varða av teimum, og sum skulu tryggja teirra tryggleika og felagsskap. Næmingar eru kanska framman fyri tey vaksnu, tí svarini hjá teimum geva hóming av, at tey sjálv vita, hvat happing er: tillátursgering

og útihýsing fyri onga grund, aðra enn hana at verða happaður. Also, happing er, tí happing er mátin at vera saman uppá. Hetta ger hana tó ikki lættari at liva í og við. Heldur tvørturímóti.

Fleiri næmingar siga í egnari frásøgn orsøkina til happing at vera ongin ella onki. Teir vita, at útsjónd, verumáti ella annað er tað, sum happingin er vend móti, men vita samstundis, at hetta er *"onki"*. Tað vil siga, at tað er meiningsleyst í sær sjálvum, men hóast hesa vitan, er upplivilsið og kenslan við happing  ræðandi, og tað fyllir í gerandisdegnum.

Tað er ilt at finna meining í meiningsloysi, og meining er avgerandi fyri kensluna av tryggleika. Hetta "onki" ger tey handlingslammað og í versta føri nakað, tey taka til sín. Tað er happingin sjálv, sum er trupulleikin, mátin at vera saman uppá. Fyri at kunna liva við hesum og koma væl burtur úr tí, krevjast vaksin, sum hava somu fatan og vitan, og sum kunnu gera og vera í mun til tað.

Møguliga er tað brúk fyri at tosa um og viðgera viðurskiftini handan happingina, sum kann geva næmingunum betur tamarhald á avleiðini. Tað er happing, men tað skal viðgerast sum ólag í skipanini, flokkinum, felagsskapinum, og harvið eisini fyribyrgjast har.

Spurningurin er so eisini, hvussu tað skal umtalast, so at næmingar betur fáa identifiserað seg við tað, sum hendir í bólkinum, og hava betur umstøður og amboð at tosa um tað. Hetta er eitt av tí, ið er neyðugt at arbeiða víðari við eftir hesa kanning.

*"Happing sokkar"*

# 4. Partur

## Átøk í skúlunum og hugburður lærarans

Eftir at kanningin um happing í fólkaskúlanum í 2007 var handað landsstýrismanninum í Menta–málaráðnum, var ein arbeiðsbólkur settur at gera tilmæli til tiltøk, ið kundu bøta um støðuna viðvíkjandi happing.

**Tilmælið**
Við støði í kanningini frá 2007 og lýsing av eyðkennum við happing, kom arbeiðsbólkurin við 7 boðum uppá tiltøk í fólkaskúlanum.

- At kanna happing millum skúlanæmingar og luttøka í altjóða kanning um trivnað.
- Trivnaðarætlanir í skúlunum.
- Ábyrgdarpersónar/toymi í hvørjum skúla.
- Lærarar fáa tíð til at arbeiða við at menna sosialar førleikar hjá næmingum.
- Eftirútbúgving av lærarum og skúlaleiðarum.
- Undirvísingartilfar.
- Heimasíða um happing.

**Tiløkini í skúlunum**
Eftir at tilmælið var handað í september 2007, vóru kunningarátøk fyriskipað, fundir, skeiðs-virksemi o.a. Fleiri av tilmælunum eru síðan sett í verk, eitt nú eru trivnaðarætlanir í øllum skúlum, AKT-læraraskipan v.m.
Tað hevur tó verið ymiskt frá skúla til skúla, hvussu umfatandi tiltøkini hava verið. Tí var í kjalarvørrinum av hesi spurnakanning um happ–ing upplagt at eftirmeta átøkini í skúlunum. Bæði fyri at vita, hvørt tey høvdu roynst væl ella illa, men eisini fyri at kunna meta um, í hvønn mun tey høvdu ávirkað gongdina innan happing.

Fyri at náa málinum við eftirmeting av tiltøkunum, valdu vit at spyrja næmingarnar í kanningini, hvat teir mettu um tiltøkini í skúlunum. Harafturat valdu vit at seta lærarunum í somu 5.,7. og 9. flokkunum nakrar spurningar í einari web-grundaðari kanning.

**Lærarakanningin**
Spurningarnir, vit settu lærarunum, vóru 10 í talið. Lærararnir fingu eina leinkju sendandi í telduposti og komu beint inn í spurningarnar, tá hon varð latin upp. Flestu spurningar vóru at krossa av, meðan onkur gav høvi til at greiða frá. 154 teldupostar vóru sendir út, og vit fingu 66 svarað spurnabløð aftur, ið svarar til 43%. Av teimum 66 lærarunum, sum hava svarað spurnablaðnum, eru tað 61% kvinnur og 39% menn. Hesir lærarar hava í miðal verið lærarar í 19 ár. Í kanningini eru skúlarnir umboðaðir soleiðis:
Smáu (1-99næmingar): 19% ella 12 lærarar. Miðal (100-299næmingar): 45% ella 29 lærarar, og stóru skúlarnir (300 og fleir næmingar) 36% ella 23 lærarar.

Mynd 43., vísir, hvat lærararnir meta um tilmæl-du tiltøkini frá 2007, og hvuss tey hava virkað í skúlunum:

| Hvørji av hesum tilmældu tiltøkum í sambandi við happing eru sett í verk í tínum skúla? | Tal | Í % |
|---|---|---|
| Trivnaðarætlan - og hon virkar | 44 | 68% |
| Trivnaðarætlan - men hon virkar ikki | 9 | 14% |
| Flokslærarar/flokstoymi - og tað virkar | 54 | 83% |
| Flokslærarar/flokstoymi - men tað virkar ikki | 3 | 5% |
| Skipan við floksins tíma - og hon virkar | 14 | 22% |
| Skipan við floksins tíma - men hon virkar ikki | 3 | 5% |
| Lærarar fáa tíð til at arbeiða við at menna sosialar førleikar hjá næmingum - og tað virkar | 19 | 29% |
| Lærarar fáa tíð til at arbeiða við at menna sosialar førleikar hjá næmingum - men tað virkar ikki | 4 | 6% |
| Atgongd til skeið og eftirútbúgving - og tað virkar | 34 | 52% |
| Atgongd til skeið og eftirútbúgving - men tað virkar ikki | 2 | 3% |
| Undirvísingartilfar - og tað virkar | 22 | 34% |
| Undirvísingartilfar - men tað virkar ikki | 4 | 6% |
| AKT-læraraskipan - og hon virkar | 48 | 74% |
| AKT-læraraskipan - men hon virkar ikki | 7 | 11% |

**Mynd 43** N=66

Sum sæst, eru lærarar samdir um, at tiltøk sum flokstoymi virka væl, at AKT-skipanin virkar, og at átakið við trivnaðarætlan virkar. Tó eru tað ikki allir, ið eru samdir, so hóast svar–prosentið er lágt, kann hetta vera ábending um, at skipanin kundi virkað betri. Semja er í ávísan mun um, at onnur tiltøk eru á einari leið, eitt nú atgongd til skeið og undirvísingartilfar. Mynd 1.

Viðvíkjandi floksins tíma, so er hetta ikki ein virkin skipan í nógvum skúlum. At byrja við ásetti MMR tíman, men seinni var hetta tikið burtur aftur. Nógvir skúlar hava ikki floksins tíma

longur, men nakrir hava verðveitt hann og skipa innihaldið sjálvir.

Lærarar meta seg sum heild at vera væl ella nøkulunda væl fyri fakliga og útbúgvingarliga at handfara happing, Mynd 44., og eingin metir seg at vera illa fyri. Hyggja vit at svarinum nøkulunda, eru tað 49%, ið siga tað. Hetta kann tulkast soleiðis, at fleiri lærarar meta seg ikki at hava nøktandi førleika til at takla trupulleikarnar við happing. At tað einans eru 10%, sum siga, at teir eru sera væl fyri, bendir helst á sama borð. Hetta vísir, at tað er tørvur á, at tað verður sett inn á hesum øki.

Stór semja er millum lærararnar, at happing fer fram í skúlanum. Av teimum spurdu siga 79%, at tað fer happing fram í skúlanum, har tey arbeiða.

Hyggja vit at spuringinum um at happa lærara, eru tað 10, sum siga, at næmingar happa lærarar, og 2, ið meta, at lærarar eisini happa næmingar. Samanborið við svarini hjá næming–unum, eru tað 43 næmingar, sum siga, at lærarar happa, og 22 siga, at tey hava verið við til at happa lærara.

**Hvør eigur ábyrgdina**

Sum vit síggja í Mynd 46. meta lærarar, at ábyrgd-in fyri happing er javnt býtt millum allar partar, eins og tað eisini verður víst á í tilmælinum frá 2007. Vektin liggur tó á, at ábyrgdin liggur mest hjá lærarunum og hjá flokslæraranum.

Hetta sigur okkum, at lærarar meta, at lærarin er týdningarmesti liðurin í at fyribyrgja og steðga happing. Teir meta eisini, at øll hava ábyrgd. T.v.s. øll, sum eru nærmast happingini, hava ábyrgd av at fyribyrgja og steðga happingini.

Í tráð við eitt av endamálunum við hesi kanning settu vit lærarunum spurningin, um teir meta, at tey átøk, sum eru fyriskipað í skúlunum síðani tilmælið í 2007, eru nøktandi. Mynd 47.

Myndin vísir, at tað eru sett tiltøk í verk, og tey hjálpa. Tey, sum hava viðmerkt undir annað, siga, at tey tiltøk, sum virka, eru m.a., at tað er ein heilsusystir í skúlanum, at tað eru næminga–samrøður, foreldraviðtalur og leypandi áminning–ar frá leiðsluni um at ansa eftir, at happing ikki fer fram. Onkur vísir á, at tað hvønn einasta dag verður prátað við næmingarnar um happing. Á onkrum skúla er skipan við vaktlærara, og tað riggar væl. Ein sigur, at tey royna at tosa við næmingar, sum happa, men eftir stutta tíð so byrjar tað aftur.

Hesi svarini frá lærarunum samsvara væl við tað, sum næmingarnir siga, eitt nú at tað verða gjørd tiltøk, og tey hjálpa, og at tað verður tosað nógv um happing í skúlanum.

Hevur skúlin so nøktandi orku og manna-gongdir til at basa happing? Mynd 48. Her síggja vit, at ein góð helvt av lærarunum meta ikki, at skúlin hevur nøktandi mannagongdir og orku. 30,2% sakna orku, 4,8% sakna mannagongdir, og 15,9% av teimum spurdu meta ikki, at skúlin hevur nøktandi mannagongdir og orku.

Hetta vísir, at støðan ikki er optimal og kundi verið væl betur.

Til seinast í spurnakanningini bóðu vit lær–ararnar koma við einum boði uppá, hvat skal til fyri at steðga happing í skúlunum.

Nærum allir svaraðu, og niðanfyri er eitt úrdrag úr tilfarinum. Vit hava valt at leggja frá–søgnirnar aftur um í fylgiskjøl, har øll kunnu lesast.




**Mynd 44.**

| Fer happing fram í skúlanum, har tú arbeiðir? | | |
|---|---|---|
| Svarmøguleikar | Í prosent | Tal |
| Ja, millum næmingarnar | 79,4% | 50 |
| Ja, lærarar happa næmingar | 3,2% | 2 |
| Ja, næmingar happa lærarar | 15,9% | 10 |
| Nei | 9,5% | 6 |
| Annað | 12,7% | 8 |
| Annað | | 13 |
| *Tey sum hava svarað* | | **63** |
| *Ógildug* | | **3** |

Mynd 45

| Hvør eigur ábyrgdina av at fyribyrgja og steðga happing í skúlanum? | | |
|---|---|---|
| Svarmøguleikar | Í prosent | Tal |
| Mentamálaráðið | 42,4% | 28 |
| Skúlastjórin | 74,2% | 49 |
| Flokslærarin | 80,3% | 53 |
| Lærararnir | 92,4% | 61 |
| Foreldrini | 83,3% | 55 |
| Børnini | 63,6% | 42 |
| Annað | 15,2% | 10 |
| *Tey sum hava svarað* | | **66** |
| *Ógildug* | | **0** |

Mynd 46

| Hvat ger skúlin fyri at fyribyrgja og steðga happing? | | |
|---|---|---|
| Svarmøguleikar | Í prosent | Tal |
| Nógv tiltøk - og tey hjálpa | 34,4% | 21 |
| Nógv tiltøk - og tey hjálpa ikki | 4,9% | 3 |
| Fá tiltøk - og tey hjálpa | 49,2% | 30 |
| Fá tiltøk - og tey hjálpa ikki | 3,3% | 2 |
| Skúlin ger einki fyri at fyribyrgja og steðga happing | 3,3% | 2 |
| Annað | 4,9% | 3 |
| Annað | | 9 |
| *Tey sum hava svarað* | | **61** |
| *Ógildug* | | **5** |

Mynd 47




Mynd 48

**Her er eitt lítið úttak av viðmerkingum frá lærarunum:**

- *Betri samstarv og greiðari ábyrgdarbýti og mannagondir.*
- *At foreldur taka ábyrgd av sínum barni og duga síggja tað í einum bólki.*
- *Meira orka, tíð og pengar*
- *Meira tíð til at skapa trivnað*
- *Arbeiðsbyrðan, har íroknað ábyrgdin, bæði menniskjaliga, sosialt og ikki at gloyma fakliga Geva lærarum møguleika at førleikamenna seg á hesum øki.*
- *Taka happingartrupulleikan meira í álvara*
- *Skapa gott grundarlag frá byrjan*
- *Miðvís upplýsing, og annars at arbeiða fyri góðum samanhaldi.*
- *Allir partar eiga lut í at steðga happing, men tað at flokslærarin hevur gott og tætt samband við næmingarnar og brúkar tíð upp á, at næmingar læra hvønn annan at kenna, er sera happingarfyribyrgjandi.*
- *Definera hvat happing er.*
- *At øll arbeiða saman um at steðga happing. Bara ein partur ikki vil vera við, oyðileggur tað eitt sindur.*
- *Fyribyrging og greið kunning um munin millum happing og arging.Seta orð á happing, ikki tiga tað burtur.*

Sum sæst á tí, sum lærararnir meta um fyribyrging av happing, so snýr tað seg í stóran mun um at skapa eina góða floksmentan, har øll taka ábyrgd fyri, at happing ikki hendir. Eisini er neyðugt við einum greiðum ábyrgdarbýti og mannagongdum sum heild, samstarv og at duga sosialar spælireglur. Men tað skal eisini meira tíð og orka til, umframt førleikamenning og ein greið definitión av, hvat happing er.

Henda lýsing er eisini eitt dømi um, hvussu samansett happing er, og hvussu samansettur trupulleikin at basa happing er. Hetta vísir eisini, at happing er livandi í skúlaumhvørvinum, at tað er ein glóð, ið ferðast og bíðar eftir at finna eitt stað at festa í. Hetta gevur samstundis vón um, at ein greiðari definitión av, hvat happing er, ein greiðari lýsing og læring um, hvussu happing kann minkast, og eitt miðvíst samskifti og ábyrgdarbýti partanna millum kann møguliga vera ein gongd leið at fara.

**Bygnaður og førleikar**

Skulu veruligar broytingar henda innan happing, er tørvur á at gera skipanir og mannagongdir í skúlunum, ið megna at taka hædd fyri tí, sum treytar happingina. Hetta eru eisini viðurskifti, ið lærararnir gera vart við í spurnakanningini.

Í 2014 var eitt álit handað landsstýris–manninum við tilmæli um broyting í skúla-bygnaðinum *(Tilmæli um skúlabygnað og læri-umstøður handað landsstýrismanninum í juli 2014)*. Verða slíkar broytingar gjørdar, er sera umráðandi, at happing verður hugsað inn í arbeiðið frá byrjan.

Her verður hugsað um broytingar, ið kunnu bøta um tað sosiala og trivnaðarliga umhvørvið í skúlanum, so betur javnvág fæst millum tær formellu og óformellu skipanirnar. Umframt umstøður, mannagongdir og orku er førleika–menning eisini eitt lyklaorð, her verður hugsað um yrkisførleikamenning á øllum stigum, eisini í sjálvari lærarautbúgvingini.

# 5. Partur

## Samandráttur og niðurstøða

Henda frágreiðing viðger úrslitið av spurnakanning, sum er gjørd millum allar næmingar í 5., 7. og 9. flokkunum í Føroyum. Kanningin er gjørd á vetri 2014/15. 94% av næmingunum hava svarað spurningum, sum snúgva seg um happing og trivnað, har eisini er greitt frá egnum upplivingum.

Umframt næmingar, hava lærarar eisini svarað spurningum um, hvat verður gjørt í skúlunum fyri at fyribyrgja og basa happing.

Burtur úr hesum umfatandi tilfari, hava vit viðgjørt og greinað happing sum fyribrigdi í fólkaskúlanum. Í hesum hava vit stuðlað okkum til fatanina av happing hjá evropeiska tvørfakliga granskingarbólkinum eXbus.

Málið við kanningini var at fáa til vega dagførda vitan, ið kann verða grundarlag undir átøkum, ið kunnu bøta um støðuna við happing.

Happing er ein trupulleiki í fólkaskúlanum, tí kanningin vísir, at 13% av næmingunum eru útsettir fyri happing. Tað mesta av happingini fer fram í fríkorterinum, men eisini í flokshølinum og aðrastaðni í skúlanum. Henda happing er bæði sálarlig og kropslig og fevnir líka frá látri og útihýsing til buking.

Í fleiri førum siga næmingarnir seg verða happaðar fyri onki ella av ongum, hetta ber boð um, at tað er brúk fyri nýggjari hugsitøkni, so at happing gerst lættari at skilja og tosa um. Tey, sum verða happað, trívast ikki eins væl og onnur, og tað gongur út yvir teirra læring og menning.

Kanningin vísir, at 13% vera happað og 16% happa. Við at taka tey 17% uppí, sum siga, at tey happa, men gera tað sjáldan, eru tað 33%, ið eru við til at happa í størri ella minni mun. Happing rakar fleiri enn tey, sum verða happað, og tey, sum happa, kunnu eisini sjálv verða fyri happing.

Happing er tekin um sosialan ótta fyri útihýsing og kann myndaliga sigast vera ein glóð, ið ferðast í umhvørvinum og leitar eftir onkrum at festa í. Tey, ið eru rakt av happing, eru í einari støðu, har tey leita eftir og finna ymiskar orsøkir til happingina. Tað kann vera útsjónd, persónligir eginleikar og hendingar t.d. í familjuni. Happing kann fara fram allastaðni, men fríkorterið hevur størsta títtleika. Happing er livandi og flytur seg og kemur og fer.

Kanningin vísir, at umleið helvtin av næmingunum óttast fyri at vera raktir av happing ella útihýsing. Einans 47% hava ongantíð upplivað happing ella eru bangin fyri tí. Nógv av happingini fer fram óbeinleiðis og krógvað. Tí er tað umráðandi m.a. at hava vitan um hesi fyribrigdi og virða fatanina hjá næminginum sjálvum av hendingini og geva samskiftinum í skúlahøpi ans.

At trupulleikin við happing er størri, enn hann sær út, og er meira og annað enn tað, sum eygað sær, sæst í tølunum í kanningini, í frágreiðingum hjá næmingunum og í lærarakanningini. Tað eru nógv, sum ikki leggja merki til happingina, fleiri siga ikki frá, og lærarar siga, at hóast teir vita, at happing fer fram, er hon trupul at fáa eyga á.

Skemt er eitt amboð, ið verður nógv brúkt í happing fyri at tillaga sambond, styrkja og minka um kenslur og fyri at marka vilja, ætlan ella ynski. Skemt og látur kann vera gagnligt, savnandi og forloysandi, men tað kann eisini fara hinvegin, at tað verður tillátursgerandi og útihýsandi.

Niðurstøðan í frágreiðingini er, at tað er ein bati at hóma á økinum, tí happing er minkað við 2% í mun til liknandi kanning, sum varð gjørd í 2007. Tá vóru 15% fyri happing, har talið í dag er 13%. Her eiga átøkini, sum vóru sett í verk aftaná kanningina, sín týdningarmikla lut.

Kanningini vísir eisini, at happing umvegis sosialar miðlar ikki er so stór sum væntað. Ein orsøk til hetta kann vera, at fleiri átøk eru gjørd fyri at tálma happing umvegis sosialar miðlar.

Hinvegin er eisini greitt, at tað enn er nógv eftir at gera við at fyribyrgja og steðga happing, har hon fer fram. Vit hava fingið eitt størri innlit í, hvussu samansett happing er, og hvussu happing rakar. Avvarðandi og skúli eiga høvuðsarbeiðið í gerandisdegnum at basa happing, men eisini myndugleikar, frítíðarfelagsskapir og samfelagið sum heild eiga sín lut, tí talan er um umfatandi og samansettar støður, sum ikki altíð eru lættar at síggja og seta orð á.

Arbeiðsbólkurin og fylgibólkurin meta, at tørvur er á at fáa orðað nøkur greið átøk við støði í hesi kanning og frágreiðing, sum enn betri kunnu fyribyrgja og minka um happing. Mælt verður til, at átøkini eru ítøkilig við meting av endamáli,

tíðarkarmi, áhugapørtum, kostnaði og ábyrgdara, so til ber at eftirmeta, um, hvussu og nær ítøkiliga málið er rokkið.

Mælt verður Mentamálaráðnum til at orða hesi átøk saman við arbeiðsbólkinum og fylgibólkinum, og at hetta verður gjørt innan 10. august 2015, so fyrstu átøkini kunnu fara í gongd frá skúlaársbyrjan 2015/16.

**Dømi um ítøkilig átøk:**

- Mentamálaráðið skal gera ein faldara til allar næmingar fólkaskúlans, foreldur og onnur avvarðandi um happing. Har skal vera skilmarking av hugtakinum í talvuformi, dømi um happing, sitat frá kanningini og hugskot til, hvussu happing kann basast, og hvør hevur/skal hava ábyrgd. Faldarin skal vera liðugur hálvan august 2015, skal verða prentaður í hóskandi eintøkum og latast øllum skúlum. Kostnaðarætlan skal gerast.
- Mentamálaráðið skal geva skúlunum boð um at skipa ein dupulttíma í hvørjum einasta skúlaflokki sama dag tíðliga í skúlaárinum 2015/16, har flokslærarin við støði í hesum faldaranum og einum samandrátti av kanningini, sum verður sendur skúlunum, tosar við flokkin um kanningina og støðuna í teirra flokki. Hvør skúli skal í hesum sambandi frammanundan hava eina lýsing á heimasíðu skúlans um tilfeingi, sum skúlin hevur til at hjálpa, har tørvur er á tí, t.d. AKT-lærarar, heilsusystrar, førleikastovur og trivnaðarætlan. Eftir henda tíman skal átakið eftirmetast á fyrstkomandi námsfrøðiliga fundi skúlans, og ein afturmelding sendast Mentamálaráðnum.
- Mentamálaráðið skal saman við Námsvísindadeildini og møguliga avvarðandi fakfeløgum skipa fyri ráðstevnu fyri leiðslum, starvsfólkum, lesandi og øðrum áhugaðum um kanningina, niðurstøðurnar og dagførda háttin at síggja/skilja fyribrigdið happing. Onkrir fyrilestrarhaldarar úr grannalondum okkara skulu bjóðast við at lýsa nýggjastu granskingina og dømi um átøk, sum hava víst seg í verki at hava fyribyrgt og tálmað happing. Góð tíð skal setast av á skránni til panelkjak um royndirnar í Føroyum síðani 2007 og metta tørvin nú. Ráðstevnan skal vera ein heilan dag t.d. leygardag, skal vera fyriskipað t.d. í Norðurlandahúsinum, og skal vera hildin í seinasta lagi 30. november. Kostnaðurin skal ásetast.

# 6. Partur

## Bókmentalisti og ískoyti

**Bókmentir**

- Bae, B. (1996) *Voksnes definitionsmagt og børns selvoplevelse*. Í Social Kritik. Nr. 47
- Christoffersen, D. D. & Petersen, K.S. (2011) *Mobning – et socialt fænomen eller et individuelt problem?* Frederikshavn: Dafolo
- Hansen, H. R. (2005): *Grundbog mod mobning* København: Gyldendals lærerbibliotek
- Hansen, H.R.  (2011) (Be)longing – *Forståelse af mobning som længsel efter at høre til* Í: Psyke&Logos nr. 32
- Kofoed, I. & Søndergaard, D.M. (red.)(2009) *Mobning Sociale processer på afveje* København: Hans Reitzels Forlag
- Kofoed, I. & Søndergaard, D.M. (red.)(2013) *Mobning gentænkt* København: Hans Reitzels Forlag
- Olweus, D. (2000): *Mobning i skolen: hvad vi ved og hvad vi kan gøre.* København: Hans Reitzel Forlag
- Stern, D.N. (2000) *Spædbarnets interpersonelle verden* København: Hans Reitzels Forlag
- Wenger, E. (2004) *Praksisfællesskaber* København: Hans Reitzels Forlag
- Hansen, H.R. (2007) *Grundbog mod mobning* Gyldendal
- Høiby, H. (2006) *Ikke mere mobning Værktøjer for lærere og pædagoger* Vejle: Kroghs Forlag
- Frånberg, Gun-Marie (2002). *Mobbning i nordiska skolor. Kartläggning av forskning om och nationella åtgärder mot mobbning i nordiska skolor.* TemaNord 2003:508 © 2003 Nordiska ministerrådet. Isbn. 92-893-0869-9.
- Schein, E. 1986
- Schott, R.M.& Søndergaard, D.M. (Red.)(2014) *School Bullying New Therories in Context* Cambrigde
- Raaheim, A. (2009) *Sosialpsykologi* Bergen: Fagbokforlaget

**Tíðarrit**

- ASTERISK NR.46. Maj-juni 2009 Danmarks Pædagogiske Universitetsskole - *Nye øjen på mobning.*
- Hansen, R.H., í: Skolen i morgen Nr.10, *Fællesskabende didaktikker,* August 2011, ASTER-ISK NR.65. Marts 2013. København.Au
- *Nye forskningsforståelser af skolemobning.* (2011) Skolen i morgen Nr. 10 Tidsskrift for skoleledelse
- *Nye perspektiver på mobning.* (2014) Pædagogisk Psykologisk Tidsskrift Blå serie 31 København: Dansk Psykologisk Forlag
- *Nye øjne på mobning.* (2009) Asterisk nr. 46 Danmarks Pædagogiske Universitetsskole
- Cambridge: Cambridge University Press

**Heimasíður**

- http://rummelighed.org/
- https://www.folkeskolen.dk/66284/undersoegelse-16-procent-bliver-mobbet

# 7. Partur

## Ískoyti

1. Framferðarháttur
2. Spurnablað til næmingarnar
3. Spurnablað til lærararnar

## Framferðarháttur

Henda kanning er ein spurnablaðskanning, sum er gjørd millum allar næmingar í 5. 7. og 9. flokkunum í føroyska fólkaskúlanum. Samlaða talið av næmingum í hesum árgangum var í skúlaárinum 2014/2015, 2.125. Talið á svaraðu spurnabløðunum var 1.995, t.v.s. eitt svarprosent á 94. Teir næmingar, sum ikki hava svarað, vóru teir, sum ikki vóru í skúla tann dagin, kanningin var gjørd.

Í hesi kanning hava vit valt at brúka tann kvantitativa kanningarháttin. Hetta tí endamálið er at kanna, hvussu umfatandi happing er. Tað hevði víðkað møguleikarnar fyri greiningum, um vit eisini valdu at brúka tann kvalitativa kanningarháttin afturat, men hesin kanningarháttur er sera tíðarkrevjandi, og tí vóru ikki stundir til tað.

Fleiri fyrimunir eru við at nýta spurnablaðskanningar sum samfelagsvísindaligt háttalag. Við spurnablaðskanning ber til at fáa kunnleika um, hvussu útbreiddar fatanir og meiningar eru millum fólk innan tað evnið, ið ætlanin er at kanna. Við støði í innsavnaða tilfarinum ber eisini til at kanna, um ymiskir bólkar av fólki í størri mun enn aðrir hava serstakar meiningar ella upplivingar. Til dømis dreingir samanborið við gentur, ein aldursbólkur samanborið við ein annan.

Men ikki einans fyrimunir eru við at brúka kvantitativar spurnablaðskanningar. Ein vansi er, at granskararnir frammanundan, at tilfarið verður innsavnað, gera av, hvat ið er mest áhugavert at spyrja um, orða spurningarnar frammanundan og avgera svarmøguleikarnar, sum svarpersónarnir hava at velja ímillum. Hetta kann hava við sær, at spurnablaðið og harvið innsavnaða tilfarið ikki rakar teir spurningar og tey viðurskifti, sum seinni vísa seg at vera av stórum týdningi.

Tó ber til at minka um hesar veikleikar við at fara vandaliga fram. Hetta er serliga galdandi, tá spurnablaðið verður gjørt. Tað er týdningarmikið at gera sær ómak við at orða spurningarnar, so at spurnablaðið megnar at savna neyðugu vitanina. Skal tað bera til at generalisera við støði í spurnakanningini, so at kanningin kann vera alment galdandi, ella fevna um ein størri bólk enn tey spurdu, so er týdningarmikið at innsavna eitt tal av spurnabløðum, sum er nóg stórt til, at til ber at siga nakað munagott um tann bólkin, sum verður kannaður, og at tey, sum spurd verða, umboða populatiónina alla, sum hon er so væl, sum til ber. Hetta kunnu vit trygt siga, at henda kanning ger, í og við, at luttøkan er 94%. Vit kunnu somuleiðis, við rímiliga góðari vissu siga, at úrslitið av hesi kanning myndar happing í føroyska fólkaskúlanum sum heild.

**Samanbering við kanningina í 2007**

Av tí at ein partur av endamálinum var at samanbera við úrslit frá kanningini í 2007, var neyðugt at velja nøkur viðurskifti út, sum kundu tryggja eitt samanberiligt grundarlag. Valið fall tí fyrst og fremst á at brúka somu flokkar t.v.s 5. 7. og 9. flokk. Umframt flokkarnar valdu vit eisini at byggja spurnablaðið upp eftir somu beinagrind, hóast orðaval og innihald í fleiri spurningum er broytt. M.a valdu vit nakrar spurningar út, sum skuldu vera møguligir at samanbera. Eitt nú hvussu nógv, hvar og hvussu tað verður happað. Samanberingin við 2007 kann sigast, hóast nevndu veikleikar, at vera rímiliga eftirfarandi.

Kanningin í 2007 bygdi á ástøðina hjá Dan Olweus. Henda nýggja kanningin er víðkað, so hon umframt at lýsa gerðir og atburð hjá einstaklingum, ið er í tráð við kanningarháttin hjá Olweus, eisini hevur tað sosiala sjónarhornið við. Hetta tryggjar møguleikan at samanbera við nýggjar kanningar, har fokus í størri mun er á happing sum eitt sosialt fyribrigdi.

**Tilrættalegging**

Fyrsti partur av kanningararbeiðinum var at tilrættaleggja og skipa arbeiðið og fáa til vega loyvi frá Dátueftirlitinum. Síðani var farið undir at orða spurnablaðið.

Við tí tøkni, sum er í skúlunum í dag, áttu næmingarnir at kunna svara spurnablaðnum á teldu. Men tíðaravmarkingin gjørdi, at vit ikki fingu stundir at seta okkum inn í nýggja forritið, skipa trygdina og fáa tey neyðugu loyvini til vega. Hetta hevði verið ein betri, skjótari og bíligari loysn, ið eigur at vera framd næstu ferð, ein slík kanning verður gjørd. Í staðin var spurnablaðið prenta, býtt út til næmingarnar, innsavnað og tappa inn í telduforrit, ið er ein nógv drúgvari tilgongd. Men tó skal sigast í tráð við spurningin, um at gera kanningina digitala ella ikki, so var tað persónliga sambandið millum spyrjaran og næmingin av alstórum týdningi fyri bæði mongd og dygd av svaraðu spurnarbløðunum.

Við grundarlagi í málsetninginum fyri kanningina var farið til verka at orða spurnablaðið og fyrireika skúlarnar á tiltakið. Hetta var gjørt í august - oktober 2014. Málið var, at kanningin skuldi gerast í skúlunum í november. Hetta eydnaðist í stóran mun, við undantaki av Suðuroynni, har kanningin var framd í januar. Vit løgdu dent á, at kanning ikki var gjørd beint eftir eina feriu, so næmingarnir í stóran mun vóru inni í tí dagliga skúlameldrinum, tá tey vóru spurd.

Tað vóru partvíst næmingar á Nád (Námsvísindadeildini/læraralesandi) og Olga Biskopstø, ið vóru í skúlunum við spurnablaðnum. Fyri at øll skuldu hava sama útgangsstøði, var ein nágreinilig vegleiðing gjørd at ganga eftir.

Í tveimum umførum sendi Mentamálaráðið kunning út til allar skúlar. Fyrsta var í august og seinna í oktober 2014. Seinna kunningin var nágreinilig og lýsti m.a. kanningarhátt og endamál. Skúlarnir fingu til uppgávu at kunna lærarar og foreldur, so øll vóru væl fyrireikað. Í fleiri skúlum høvdu lærarar og næmingar viðgjørt evnið happing nakað frammanundan kanningini.

**Úti í skúlunum**

Nágreiniliga fór kanningin fram á henda hátt: Avtala gjørd við skúlan frammanundan. Ásettu tíðina kom tann/tey, sum gjørdu kanningina, inn í flokkin, býttu spurnablaðið út og vóru í flokkinum, meðan tað var svarað. Næmingarnir fingu høvi at spyrja um ivamál og fingu vegleiðing, um tað var okkurt, tey ikki skiltu. Álagt var næmingunum ikki at sita ov nær síðufelaganum, og loyvt var ikki at tosa saman. Í flestu skúlum var lærari inni undir spurnakanningini, hann veitti hjálp, um næmingar yngstu tað. Áðrenn spurnablaðið var deilt út, var víst á, at hetta var eitt álvarsamt evnið, og at tað hevði týdning, at tey svaraðu erligt og rætt. Vit greiddu ikki frá, hvat happing var, og fá spurdu. Nakrir spurningar vóru um argan og klandur í mun til happing. Tá hesir komu upp, var tosað við allan flokkin um munin á happing og argan. Spurnakanningin var væl móttikin í skúlunum, og lærarar vóru hjálpsamir og fyrikomandi.

Vit góðu okkum stundir at vegleiða og svara spurningunum frá næmingunum, og okkara meting er, at tey allar flestu skiltu spurningarnar og hava svara eftir egnari sannføring. Tað var ongantíð ófriður ella annað, ið órógvaði næmingarnar. Í onkrum føri sótu fleiri flokkar saman í størri høli, men í flestu førum sat flokkurin í egnum flokshøli. Tað tók millum 15 og 30 minuttir at svara. Veikir næmingar fingu meira tíð og fingu tilboð um stuðul.

Tað vóru nøkur orð, ið flestu næmingar, serliga í 5. men eisini 7. flokki spurdu um, hesi vóru ósemjur, faklig og trívast. Tí valdu vit at greiða flokkinum frá, hvat hesi orð merktu, áðrenn byrjað var.

**Innihaldið í spurnablaðnum**

Dentur var lagdur á fýra viðurskifti: 1. spurn–ingarnir skuldu orðast soleiðis, at teir megnaðu at geva svar á ivamálini, ið málsetningurin reisti, 2. breiddin skuldi tryggja, at tað var gjørligt at seta svarini inn í ein ástøðiligan og fakligan kontekst, 3. Spurningarnir skuldu vera einfaldir bæði málsliga og innihaldsliga, so næmingarnir skiltu teir, og 4. næmingarnir skuldu hava møguleikan at svara frá hjartanum, tvs. kunna seta egin orð á upplivingar og støður.

Vit løgdu dent á, at spurningarnir ikki vóru avmarkandi. Tey fingu valmøguleika at siga nei, ja, ofta, viðhvørt, og fyrr men ikki longur. Orsøkin er hugsanin um, at tað ikki hevur týdning fyri kanningina at vita ítøkiliga, nær og hvussu ofta happing fer fram, men um næmingurin er fyri happing nú, ella hevur verið tað. Hetta sæð í mun til tær avleiðingar, ið vit vita, at happing, óansæð nær hon er farin fram, hevur á trivnaðin.

Frammanundan kanningini royndu vit spurnabløðini millum næmingar í 5., 7. og 9. flokki í Venjingarskúlanum. Umframt tað tosaðu vit við

næmingar, ið stóðu aftanfyri ein facebook-bólk, ið hevði varpað ljós á happing, og tosaðu við onnur heimildar- og fakfólk. Hetta var gjørt fyri at tryggja, at spurningarnir vóru so viðkomandi sum til bar.

Hóast vit løgdu okkum eftir, at tað ikki skuldi vera feilir í spurnablaðnum, eydnaðist hetta ikki til fulnar. Einstakir veikleikar vóru og onkrir smávegis feilir, hetta hava vit tikið hædd fyri í viðgerðini av tilfarinum. Eitt nú í spurningi 3.j. tí hava vit strika hann. Ein annar feilur ella veikleiki er, at vit í spurninginum um at hava happað, hava skrivað ”sjáldan” í staðin fyri ”viðhvørt” eins og í spurninginum um at vera happaður. Vit hava valt at síggja sjáldan sum tað, at ein hevur verið við til at happa, tað er ikki ofta, men viðhvørt, og telja tí úrslitið við á tann hátt.

**Viðgerð av spurnabløðunum**

Til at viðgera tað stóra dátutilfarið, hava vit brúkt skipanina NSD-Stat (Norsk vísundalig dátutænasta), ið ger tað møguligt at viðgera og greina vísindalig data. Tá øll spurnabløðini vóru svarað, var tilfarið ført inn í ein NSD-dátugrunn. Hetta var gjørt í tíðarskeiðinum januar-mars 2015. Dátumongdin er síðani brúkt sum grundarlag undir skrivligu frágreiðingini.

Sum liður at seta okkum inn í fakliga kjakið, sum er innan happing í okkara grannalondum í dag, fingu vit ein fund við tveir av granskarunum í eXboks granskingartoyminum, Dorte Marie Søndergård, Professor, dr.philos, og Inge Henningsen, cand. Stat. Hetta gav innlit í fleiri viðurskifti og vísti, at okkara kanningarúrslit í fleiri førum vóru meinlík úrslitum hjá teimum.

**Kanningin millum lærararnar**

Spurnakanningin millum lærararnar var skipað sum ein web-kanning. Vit valdu at brúka SurveyMonkey skipanina til endamálið. Hetta er ein on-line kanningarportalur, sum verður nógv brúktur, bæði av útbúgvingarstovnum, fyritøkum o.ø. Vit gjørdu 10 spurningar, sum vóru settir lærarum, ið hava 5., 7., og 9. flokk. Til samans 154 lærarar fingu teldupost við leinkju til spurnablaðið. Av hesum hava 66 svara spurningunum, ið er eitt svarprosent á 43%.

Spurnakanningin millum lærararnar hevði til endamáls at kanna, í hvønn mun átøkini, sum vóru tilmæld í 2007, vóru sett í verk, og í hvønn mun lærararnir mettu, at hesi virkaðu. Vit nýttu eisini høvi at spyrja aðrar spurningar, eitt nú um teirra meting av, hvør eigur ábyrgdina av happing, og hvussu happing kann steðgast. Vit greinaðu spurningarnar í ServeyMonkey skipanini og hava lýst úrslitið í frágreiðingini 5. Parti.

**Hugtakið happing í spurnablaðnum**

Í vegleiðingini til álitisfólk og lærarar í sambandi við spurnablaðið 2014/15 stóð hesin tekstur um hugtakið happing:

*”Um tú ert í iva um sjálvt orðið happing, lýsa vit tað soleiðis: Happing í skúlanum er, tá ein næmingur í eina tíð verður forfylgdur ella hildin uttanfyri. Happing kann fara fram upp á nógvar mátar: andlit til andlits ella við fartelefon, interneti og chat. Happing kann vera beinleiðis og sjónlig ella óbeinleiðis og krógvað. Tað finnast eisini aðrir mátar at forklára happing uppá. Tað mest avgerandi er, at næmingurin sjálvur metir, um talan er um happing”.*

Definitiónin kom sostatt ikki næmingunum, sum svaraðu spurnablaðnum, í hendi, men tey fingu hana, um tey bóðu um vegleiðing.

Í kanningini í 2007 var framferðarhátturin viðvíkjandi definitiónini ein annar. Tá stóð definitiónin inni í spurnablaðnum og var lisin upp fyri næmingunum undan kanningini. Tann definitiónin av hugtakinum var meira umfatandi og sæst niðanfyri.

Tað kom fyri, at næmingar spurdu, hvat meint verður við happing, men tað snúði seg mest um, hvørt tað var happing at arga, og at taka húgvuna og goyma hana. Í slíkum føri lýstu vit hugtakið happing, sum nevnt omanfyri.

Hóast orðið happing í fleiri førum verður brúkt í spurnablaðnum, royndu vit tó at orða okkum soleiðis, at næmingurin í mest møguligan mun sjálvur skuldi meta, um tað, hann/hon hevði verið fyri, var happing, og at tað bygdi á kenslurnar hjá næminginum, heldur enn eina fastlagda definitión.

**Lýsingin av happing í spurnakanningini 2007**

***“Um at verða happað/ur***

*Ein næmingur verður happaður, tá ein annar næmingur ella fleiri aðrir næmingar:*

*siga okkurt óreint ella ljótt við hann/hana, gera gjøldur burtur úr honum/henni ella nýta illavorðin og særandi eyknevni, leypa hann/hana um ella halda hann/hana uttan fyri vinaflokkin við vilja*

*sláa, sparka, royta, skumpa ella steingja hann/hana inni, lúgva ella slatra okkurt ósatt um hann/hana ella senda ljót sms boð og royna at fáa onnur til ikki at dáma hann/hana*

*og annað tílíkt. Tá ein verður happað/ur, endurtaka hesar hendingar seg fleiri ferðir, og tað er torført fyri tann happaða at verja seg. Um ein næmingur verður argaður fleiri ferðir á ein óreinan og særandi hátt, so er talan um happing.*
*Tað er ikki happing, um onkur verður argað/ur á ein skemtiligan og vinarligan hátt. Tað er heldur ikki talan um happing, tá tveir næmingar, sum eru umleið eins sterkir, berjast ella klandrast".*

Hóast hugtakið happing ikki hevur verið brúkt eins í kanningunum 2007 og 2014/15, so meta vit ikki, at hetta avmarkar møguleikan at samanbera úrslitini. Styrkin er, at vit í hesi nýggju kanningini eisini hava tryggjað okkum at kunna brúka tilfarið í samanbering við nýggjari gransking, eitt nú tær sum eXboks fyriskipar.

# Spurnablað um happing í skúlanum

## November 2014

**Eg eri** ☐ genta ☐ drongur

**og gangi í** ☐ 5. flokki ☐ 7. flokki ☐ 9. flokki

Tá tú hevur svarað hesum spurningum, ert tú við til at lýsa og økja um vitanina um happing. Hendan vitanin er týdningarmikil í arbeiðinum at fyribyrgja happing og økja trivnaðin hjá øllum næmingum í skúlanum.

Granskingardepilin fyri økismenning

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

MENTAMÁLARÁÐIÐ

## Spurningar um teg og flokkin

| | | |
|---|---|---|
| **1.** | **Hvussu trívist tú í skúlanum?** | ❑ Sera væl<br>❑ Væl<br>❑ Hvørki væl ella illa<br>❑ Illa<br>❑ Sera illa |
| **2.** | **Hvussu dugir tú fakliga í skúlanum?** | ❑ Sera væl<br>❑ Væl<br>❑ Hvørki væl ella illa<br>❑ Illa<br>❑ Sera illa |

| **3.** | **Í okkara flokki*:** | Ja, altíð | Ja, sum oftast | Viðhvørt | Sjáldan | Ongantíð |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | a. halda vit saman | ❑ | ❑ | ❑ | ❑ | ❑ |
| | b. tosa vit um ósemjur | ❑ | ❑ | ❑ | ❑ | ❑ |
| | c. gera vit nógv fyri, at øll skulu føla seg væl | ❑ | ❑ | ❑ | ❑ | ❑ |
| | d. fáa vit at vita, at vit eru ein góður flokkur | ❑ | ❑ | ❑ | ❑ | ❑ |
| | e. hava vit floksins tíma | ❑ | ❑ | ❑ | ❑ | ❑ |
| | f. hava vit gjørt avtalu um, hvussu vit skulu vera saman | ❑ | ❑ | ❑ | ❑ | ❑ |
| | g. tosa vit væl saman | ❑ | ❑ | ❑ | ❑ | ❑ |
| | h. er arbeiðsfriður | ❑ | ❑ | ❑ | ❑ | ❑ |
| | i. trívast øll | ❑ | ❑ | ❑ | ❑ | ❑ |
| | j. er ongin happing | ❑ | ❑ | ❑ | ❑ | ❑ |
| | k. er gott at vera | ❑ | ❑ | ❑ | ❑ | ❑ |
| | l. eru øll vinir | ❑ | ❑ | ❑ | ❑ | ❑ |

**Her kanst tú seta fleiri X*

| | | |
|---|---|---|
| **4.** | **Hevur tú vinir í flokkinum?** | ❑ Ja, fleiri<br>❑ Ein<br>❑ Ongan |
| **5.** | **Hevur tú vinir í øðrum flokkum?** | ❑ Ja, fleiri<br>❑ Ein<br>❑ Ongan |

## Spurningar um happing

| | | |
|---|---|---|
| **6.** | **Ert tú vorðin happað/ur í skúlanum?** | ❑ Nei<br>❑ Ja, viðhvørt<br>❑ Ja, ofta<br>❑ Ja, fyrr, men ikki longur |
| **7.** | **Ert tú vorðin happað/ur aðrastaðni enn í skúlanum?** | ❑ Nei<br>❑ Ja, viðhvørt<br>❑ Ja, ofta<br>❑ Ja, fyrr, men ikki longur |
| **8.** | **Kennir tú nakran, sum verður happaður í skúlanum?** | ❑ Nei<br>❑ Ja, ein<br>❑ Ja, fleiri<br>❑ Ja, men tann happingin er steðgað |

## At verða happað/ur

| | | |
|---|---|---|
| ***9.*** | **Eg havi verið hildin uttanfyri ella eri ikki sloppin uppí.** | ❑ Nei<br>❑ Ja, viðhvørt<br>❑ Ja, ofta |
| **10.** | **Aðrir næmingar hava flent eftir mær, hava kallað meg ella brúkt orð, sum særdu meg** | ❑ Nei<br>❑ Ja, viðhvørt<br>❑ Ja, ofta |

3

| | | |
|---|---|---|
| **11.** | **Eg havi verið sligin, sparkað/ur, roytt/ur, skumpað/ur, stongd/ur inni ella annað líknandi.** | ❑ Nei<br>❑ Ja, viðhvørt<br>❑ Ja, ofta |
| **12.** | **Aðrir næmingar hava logið um meg, slatrað um meg, baktalað meg ella roynt at fáa onnur til ikki at dáma meg.** | ❑ Nei<br>❑ Ja, viðhvørt<br>❑ Ja, ofta |
| **13.** | **Aðrir næmingar hava krógvað ting fyri mær, t.d. húgvu, penalarhús, skrivihefti ella annað líknandi.** | ❑ Nei<br>❑ Ja, viðhvørt<br>❑ Ja, ofta |
| **14.** | **Eg havi verið noydd/ur at gera ymiskt, sum eg ikki vildi gera.** | ❑ Nei<br>❑ Ja, viðhvørt<br>❑ Ja, ofta |
| **15.** | **Aðrir næmingar hava happað meg, orsakað av mín/i/um:**<br><br>***Tú kanst seta fleiri x*** | ❑ útsjónd<br>❑ húðaliti<br>❑ trúgv<br>❑ máli<br>❑ klæðum<br>❑ ítrivi<br>❑ annað Hvat: ____________________ |
| **16.** | **Aðrir næmingar hava sent eygu, fingur, vent rygg, himlað ella hermt, sum særdi meg.** | ❑ Nei<br>❑ Ja, viðhvørt<br>❑ Ja, ofta |
| **17.** | **Aðrir næmingar hava sent boð ella myndir á fartelefonini ella internetinum (facebook, snapchat o.a.), sum særdu meg.** | ❑ Nei<br>❑ Ja, viðhvørt<br>❑ Ja, ofta |
| **18.** | **Annað:** ____________________<br>______________________________<br>________________________ | |

4

## Aðrir spurningar um happing

| | | |
|---|---|---|
| 19. | **Hvør hevur happað teg?**<br><br>***Tú kanst seta fleiri x*** | ❑ Eri ikki happað/ur í skúlanum<br>❑ Mest ein næmingur í mínum flokki<br>❑ Fleiri næmingar í mínum flokki<br>❑ Næmingar í øðrum flokkum<br>❑ Lærari<br>❑ Onnur vaksin í skúlanum |
| 20. | **Ert tú happað/ur av dreingjum ella gentum?** | ❑ Eri ikki happað/ur í skúlanum<br>❑ Mest av einari gentu<br>❑ Av fleiri gentum<br>❑ Mest av einum drongi<br>❑ Av fleiri dreingjum<br>❑ Av bæði gentum og dreingjum |

| | | |
|---|---|---|
| 21. | **Hvar ert tú vorðin happað/ur?**<br><br>***Tú kanst seta fleiri x*** | ❑ Eri ikki vorðin happað/ur<br>❑ Í fløkshølinum<br>❑ Aðrastaðni í skúlanum<br>❑ Í fríkorterinum<br>❑ Uttanfyri skúlan<br>❑ Í fartelefonini<br>❑ Á internetinum<br>❑ Í snapchat<br>❑ Á facebook<br>❑ Aðrastaðni Hvar:_______________ |

| | | |
|---|---|---|
| **22.** | **Hevur tú sagt við nakran, at tú ert vorðin happað/ur?**<br><br>***Tú kanst seta fleiri x*** | ❑ Ja,við<br>❑ Flokslæraran<br>❑ Heilsufrøðing<br>❑ Annan vaksnan í skúlanum<br>❑ Onkran vaksnan heima<br>❑ Tann ella tey, sum happaðu meg<br>❑ Onkran annan Hvønn: ___________<br><br>❑ Nei<br>❑ Hevði ongan at siga tað við<br>❑ Vísti ikki, hvønn eg skuldi siga tað við<br>❑ Var bangin<br>❑ Lærararnir gera einki allíkavæl<br>❑ Kláraði tað sjálv/ur<br>❑ Annað: ________________________ |

| | | |
|---|---|---|
| **23.** | **Hevur tú fingið hjálp í skúlanum, tá tú ert vorðin happað/ur?** | ❑ Eg eri ikki blivin happað/ur<br>❑ Ja, eina ferð<br>❑ Ja, fleiri ferðir<br>❑ Ja, men tað er byrjað aftur<br>❑ Nei |

*Framhald á síðu 7* →

6

| | | |
|---|---|---|
| **24.** | **Hvat ger skúlin við happing?**<br><br>***Tú kanst seta fleiri x*** | ❑ Nógv og tað hjálpir<br>❑ Nógv og tað hjálpir ikki<br>❑ Einki<br>❑ Lærarin fortelir um happing<br>❑ Lærarin tosar við flokkin<br>❑ Vit hava avtalu í flokkinum, um hvussu vit gera, um onkur følir/kennir seg happaðan<br>❑ Vit hava floksins tíma<br>❑ Lærarin hevur næmingasamrøður<br>❑ Lærarin tosar við tey, sum happa<br>❑ Lærarin tosar við tey, sum eru vorðin happað<br>❑ Lærarin tosar við foreldrini/foreldrafundur<br>❑ Fyrilestrar og tiltøk um happing<br>❑ Annað Hvat: ______________________ |
| **25.** | **Hvat gert tú, tá onnur verða happað?**<br><br>***Tú kanst seta fleiri x*** | ❑ Blandi meg ikki uppí<br>❑ Fari avstað<br>❑ Einki<br>❑ Veit ikki, hvat eg skal gera<br>❑ Einki, men havi tað ikki gott<br>❑ Verði bangin<br>❑ Einki og hugsi, gott, at tað ikki eri eg<br>❑ Sigi tað við læraran<br>❑ Sigi tað heima<br>❑ Sigi tað við hini børnini<br>❑ Verði ill/ur<br>❑ Hugsi, at tey hava gott av tí<br>❑ Havi ikki lagt merki til, at nakar verður happaður |

| | | |
|---|---|---|
| **26.a** | **Er tú bangin fyri at verða happað/ur?** | ❑ Ongantíð<br>❑ Sjáldan<br>❑ Viðhvørt<br>❑ Eitt sindur ofta<br>❑ Ofta<br>❑ Sera ofta |
| **26.b** | **Ert tú nakrantíð bangin fyri, at aðrir næmingar ikki dáma teg og halda teg uttanfyri?** | ❑ Ongantíð<br>❑ Sjáldan<br>❑ Viðhvørt<br>❑ Eitt sindur ofta<br>❑ Ofta<br>❑ Sera ofta |

## At happa

| | | |
|---|---|---|
| **27.** | **Hevur tú verið við til at happa?** | ❑ Ja<br>❑ Sjáldan<br>❑ Ofta<br>❑ Ja, men bara saman við øðrum<br>❑ Nei |
| **28.** | **Eg havi verið við til at hildið næming uttanfyri ella ikki lovað uppí.** | ❑ Ja<br>❑ Sjáldan<br>❑ Ofta<br>❑ Ja, men bara saman við øðrum<br>❑ Nei |

| | | |
|---|---|---|
| **29.** | **Eg havi verið við til at flent at næmingi, kallað ella sagt okkurt, sum hevur sært hann/hana.** | ❑ Ja<br>❑ Sjáldan<br>❑ Ofta<br>❑ Ja, men bara saman við øðrum<br>❑ Nei |
| **30.** | **Eg havi verið við til at sligið, sparkað, roytt, skumpað næming, givið buksuvatn ella stongt hann/hana inni.** | ❑ Ja<br>❑ Sjáldan<br>❑ Ofta<br>❑ Ja, men bara saman við øðrum<br>❑ Nei |
| **31.** | **Eg havi verið við til at logið um næming, slatrað um næming, baktalað ella roynt at fingið onnur til ikki at dáma hann/hana.** | ❑ Ja<br>❑ Sjáldan<br>❑ Ofta<br>❑ Ja, men bara saman við øðrum<br>❑ Nei |
| **32.** | **Eg havi verið við til at krógvað ting t.d. húgvu, penalarhús, skrivihefti o.a. fyri næmingi.** | ❑ Ja<br>❑ Sjáldan<br>❑ Ofta<br>❑ Ja, men bara saman við øðrum<br>❑ Nei |
| **33.** | **Eg havi verið við til at noytt næming at gera ymiskt, hann/hon ikki vildi gera.** | ❑ Ja<br>❑ Sjáldan<br>❑ Ofta<br>❑ Ja, men bara saman við øðrum<br>❑ Nei |

| | | |
|---|---|---|
| **34.** | **Eg havi verið við til at happa næming/ar orsakað av teirra:**<br><br>***Tú kanst seta fleiri x*** | ❑ útsjónd<br>❑ húðaliti<br>❑ trúgv<br>❑ máli<br>❑ klæðum<br>❑ ítrivi<br>❑ øðrum, Hvat: ____________________ |
| **35.** | **Eg havi verið við til at happa næming við at senda eygu, fingur, himla, venda rygg ella herma.** | ❑ Ja<br>❑ Sjáldan<br>❑ Ofta<br>❑ Ja, men bara saman við øðrum<br>❑ Nei |
| **36.** | **Eg havi verið við til at happa næming á fartelefonini og á internetinum (facebook, snapchat o.a.)** | ❑ Ja<br>❑ Sjáldan<br>❑ Ofta<br>❑ Ja, men bara saman við øðrum<br>❑ Nei |

| | | |
|---|---|---|
| **37.** | **Eg havi verið við til at happa lærara.** | ❑ Ja<br>❑ Sjáldan<br>❑ Ofta<br>❑ Ja, men bara saman við øðrum<br>❑ Nei |

| | | |
|---|---|---|
| **38.** | **Hevur tú fingið hjálp í skúlanum, tá tú hevur verið við til at happa?** | ❑ Eg havi ikki happað<br>❑ Ja, eina ferð<br>❑ Ja, fleiri ferðir<br>❑ Nei |

**39. Sig okkum frá hending um happing, heilt stutt:**

______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

**40. Aðrar viðmerkingar:**

______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

______________________________________________

***Takk fyri svarini*** ☺

11

Góði lærari.

Hendan spurnakanningin er partur av kanningini um happing í føroyska fólkaskúlanum 2014/15, ið Granskingardepilin - Fróðskaparsetur Føroya gera eftir áheitan frá MMR.

Vísandi til *Tilmæli um tiltøk til tess at fyribyrgja happing í fólkaskúlanum, MMR sept. 2007*, er endamálið við hesari spurnakanning at fáa vitan um, hvørji tilmæld tiltøk eru framd í skúlanum síðani tá og hvørja meting lærarar hava teimum viðvíkjandi.

Harumframt er endamálið eisini at fáa innlit í, í hvønn mun lærarar meta seg vera brynjaðar til at fyribyrgja og handfara happing.

Spurnakanningin er skipað sum ein "online-kanning". Lærarar í 5.,7. og 9. flokkum um alt landið verða spurdir. Tað er í tráð við sjálva kanningina um happing, har bert næmingar úr hesum somu floksstigunum hava luttikið.

Luttøkan í kanningini er anonym. Hetta tryggjar skipanin,sum hon er gjørd í. Tað eru bara svarini, sum verða skrásett. Onki annað.

Takk fyri at tú vilt brúka nakrar minuttir uppá at svara.

**1. Ert tú kvinna ella maður?**

▼

**2. Í hvussu nógv ár hevur tú verið útbúgvin lærari?**

**3. Hvussu stórur er skúlin, tú arbeiðir í?**

▼

**4. Hvørji av hesum tilmældu tiltøkum í samband við happing eru sett í verk á tínum skúla?**

- ☐ Trivnaðarætlan - og hon virkar
- ☐ Trivnaðarætlan - men hon virkar ikki
- ☐ Flokslærarar/flokstoymi - og tað virkar
- ☐ Flokslærarar/flokstoymi - men tað virkar ikki
- ☐ Skipan við floksins tíma - og hon virkar
- ☐ Skipan við floksins tíma - men hon virkar ikki
- ☐ Lærarar fáa tíð til at arbeiða við at menna sosialar førleikar hjá næmingum - og

tað virkar

- ☐ Lærarar fáa tíð til at arbeiða við at menna sosialar førleikar hjá næmingum - men tað virkar ikki
- ☐ Atgongd til skeið og eftirútbúgving - og tað virkar
- ☐ Atgongd til skeið og eftirútbúgving - men tað virkar ikki
- ☐ Undirvísingartilfar - og tað virkar
- ☐ Undirvísingartilfar - men tað virkar ikki
- ☐ AKT-læraraskipan - og hon virkar
- ☐ AKT-læraraskipan - men hon virkar ikki

### 5. Hvussu væl metir tú teg vera fyri fakliga og útbúgvingarliga at handfara happing?

- ○ Sera væl
- ○ Væl
- ○ Nøkulunda
- ○ Ikki væl
- ○ Stak illa

### 6. Fer happing fram í skúlanum, har tú arbeiðir?

- ☐ Ja, millum næmingarnar
- ☐ Ja, lærarar happa næmingar
- ☐ Ja, næmingar happa lærarar
- ☐ Nei
- ☐ Annað

Annað

____________________

### 7. Hvør eigur ábyrgdina av at fyribyrgja og steðga happing í skúlanum?

- ☐ Mentamálaráðið
- ☐ Skúlastjórin

- [ ] Flokslærarin
- [ ] Lærararnir
- [ ] Foreldrini
- [ ] Børnini
- [ ] Annað

### 8. Hvat ger skúlin fyri at fyribyrgja og steðga happing?

Annað

### 9. Hevur skúlin hjá tær nøktandi mannagongdir og orku til at fyribyrgja og steðga happing?

### 10. Hvat skal til fyri at steðga happing í skúlanum?